# ÁRSFRÁGREIÐING
# 2025

FÓTBÓLTSSAMBAND FØROYA

#saman**framá**

# ÁRSFRÁGREIÐINGIN 2025

# FÓTBÓLTSSAMBAND FØROYA

# FSF Ársfrágreiðingin 2025

**Útgevari** Fótbóltssamband Føroya

**Lagt til rættis og umbróting** Hans Erik Danielsen

**Takk til** Inga Arge, Róa Reinert Hansen, Erlu Sundberg Patursson, Mariu Ziskason, Christinu Ravnsfjall, FaroeSoccer, portal.fo og in.fo

**Myndir** Oliver Joensen, Sverri Egholm, Álvur Haraldsen, Jóhanna Thomsen Bjarni Enghamar og Hans Erik Danielsen

**Forsíða** Pætur Eyðunsson Jensen

**Prent og innbinding** Controlp.fo
Tórshavn, februar 2026

# Innihaldsyvirlit

**Innihaldsyvirlit** .......... 3

**46. aðalfundur Fótbóltssamband Føroya** .......... 5

**Lógir fyri Fótbóltssamband Føroya (FSF)** .......... 22

**Ársroknskapur 2024** .......... 58

**Tilmeldingar 2015-2025** .......... 76

Tilmeldingar (feløg) .......... 77

**Heiðursmerkjabýti 2015-2025** .......... 78

**Endaligar støður í lands- og steypakappingum 2025** .......... 79

**Landskappingar 2025** .......... 80

Betrideildin menn .......... 80

1. deild menn .......... 81

2. deild menn .......... 82

3. deild menn .......... 83

Old Boys +35 .......... 84

Old Boys +45 .......... 85

U21 .......... 86

U17 dreingir .......... 87

U15 dreingir .......... 88

U13 dreingir .......... 89

Betrideildin kvinnur .......... 90

1. deild kvinnur .......... 93

Old Girls .......... 94

U16 gentur .......... 95

U13 gentur .......... 96

**Steypakappingar 2025** .......... 97

Løgmanssteypið (steypakappingin menn) .......... 97

Thomas Dam Intersport steypið (U21) .......... 99

Blaðberasteypið (U17 dreingir) .......... 100

Cadburysteypið (U15 dreingir) .......... 101

Solarsteypið (U13 dreingir) .......... 103

Steypakappingin kvinnur .......... 105

Minna steypakapping (kvinnur) .......... 107

Eilif Arge steypið (U16 gentur) .......... 108

Steypakappingin U13 gentur .......... 109

Lions Club Stórsteypið (menn) ... 111
Lions Club Stórsteypið (kvinnur) ... 112

**Landsliðini ... 113**
Manslandsliðið ... 113
U21-landsliðið ... 135
U19 dreingir ... 151
U17 dreingir ... 160
U16 dreingir ... 175
U15 dreingir ... 177
Kvinnulandsliðið ... 181
U19 gentur ... 199
U17 gentur ... 213
U16 gentur ... 233
U15 gentur ... 235

**WU17 – Fyrsta EM endaspæl í Føroyum ... 241**

**Kvinnur í fótbólti ... 243**

**Føroysk lið í altjóða fótbólti ... 245**

**Venjaraútbúgvingin ... 262**

**Dómarar ... 264**

**Grassroots (grasrøturnar) ... 271**

**Disney Playmakers ... 275**

**Kæruúrskurðir 2025 ... 277**

# 46. aðalfundur Fótbóltssamband Føroya

## 46. regluligi aðalfundur Fótbóltssamband Føroya
## leygardagin, 8. mars 2025, kl. 13.00

Forsetin bjóðaði luttakarunum vælkomnum á aðalfund.

Vasco Stock da Cunha, frá FIFA, bar aðalfundinum eina heilsan frá FIFA

Valentina Mercolli, frá UEFA, bar aðalfundinum ein heilsan UEFA.

Hildið varð síðani áfram við sjálvum aðalfundinum við hesi aðalfundarskrá:

1. Val av Fundarstjóra eftir tilmæli frá Starvsnevndini ........ 1
2. Góðkenning av dagsskrá ........ 3
3. Forsetin greiður frá virksemi FSF's í farna ári. ........ 3
4. Val av limum at eftirkanna fundarfrágreiðingina ........ 13
5. Val av eftirlitsfólki ........ 13
6. Góðkenning av fundarfrágreiðing frá undanfarna aðalfundi ........ 13
7. Ársfrágreiðing (sum lýsir virksemið síðani seinasta aðalfund) ........ 14
8. Framløga og góðkenning av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu fyri farna roknskaparár ........ 14
9. Uppskot frá Starvsnevndini ........ 14
   Lógir FSF ........ 14
10. Val av óheftum grannskoðara eftir uppskoti frá Starvsnevndini ........ 15
11. Val av Forseta og limum í Starvsnevndina ........ 15
12. Val av limum í Aga- og etiskunevndina og Yvirkærunevndina, valdir fyri 2 ár ........ 16
13. Ymiskt ........ 16

---

### 1. Val av Fundarstjóra eftir tilmæli frá Starvsnevndini

Forsetin mælti starvsnevndarinnar vegna til at velja Inga Højgaard til fundarstjóra, og varð hetta einmælt samtykt, og gav hann síðani orðið til Inga Højgaard.

Møtt:

| | |
|---|---|
| **07 Vestur** | Jón Nordendal, Jens Kristian Haraldsen |
| **AB** | Marius Thomassen, Jytta Drangastein |
| **B36** | Marita Debess Magnussen, Uni Holm Johannesen |
| **B68** | Jóhannus Danielsen, Johnleif Gerðisá, Rasmus Zachav |
| **B71** | Jóhanna Jancyardóttir, Gerda B. Magnussen |
| **EB/Streymur** | Jóhannes Hansen, Theodor í Búrstovu |
| **FC Hoyvík** | Fróði Danielsen, Bjarni Beder |
| **FC Suðuroy** | Eyðbjørn Thomsen, Julius Vest Joensen, Jákup Olsen |

| | |
|---|---|
| **HB** | Ransin Napoleon Djurhuus, Lars Muller |
| **ÍF** | Njál Reinert Petersen, Fríði Reinert Petersen |
| **KÍ** | Tummas Lervig, Rúni Heinesen, Hilmar Danielsen |
| **MB** | Elisabeth Haraldsen, Marin Elisabeth Vidtfeldt, Liljan Witt |
| **NSÍ** | Høgni Lamhauge, Herbjørg H. Jøkladal |
| **Royn** | Eyðstein Jacobsen |
| **Skála** | Jóannes Prestá, Sveinur Ellefsen, Jakob Lind Jakobsen |
| **TB** | Andre Dalfoss |
| **Víkingur** | Brandur Jacobsen, Hanna E. Olsen, Petur A. Lervig |
| | |
| **Nevnd FSF's:** | Christian Andreasen, forseti, Róin Schrøter, Anja Rein, Fríðin Ziskason, Heri á Rógvi, Maria Jóhannusardóttir Joensen, Rúni Herup Olsen |
| | |
| **Fyrisitingin:** | Kristin Dam Ziska, Andras Kjartansson Thomassen, Ása Klakstein Kalsø, Brynhild Absalonsen, Doris í Garði Olafsdóttir, Eyðvør Jakobsen, Hans Erik Danielsen, Ingi Arge, Jan Falkenberg, Josva Thomsen, Lassin Isaksen, Maria Ziskason, Pætur S. Clementsen, Rói Reinert Hansen |
| | |
| **Aganevndin:** | Eingin |
| **Yvirkærunevndin:** | Eingin |
| **Loyvisnevndin:** | Eingin |
| **Kærunevndin í loyvism.:** | Eingin |
| **UEFA:** | Valentina Mercolli |
| **FIFA:** | Vasco Stock da Cunha |
| **ÍSF:** | Elin Heðinsdóttir |
| **FDF:** | Eingin |
| **FVF:** | Eingin |
| **JANUAR:** | Óli Joensen, Andrias Eriksen, Rókur Trygvason |
| **Onnur:** | Virgar Hvidbro, John Eystberg, Sólrun Hendriksdóttir Sørensen, Karl Vidtfeldt |
| | |
| **Fjølmiðlar:** | Agnar Prestá, Portal.fo<br>Álvur Haraldsen, Miðlahúsið<br>Ásbjørn Nattestad, Rás 2<br>Emil Jacobsen, KVF<br>Jákup Ósá, Norðlýsið |

Aðalfundur Fótbóltssamband Føroya 8. mars 2025

2/17

## 2. Góðkenning av dagsskrá

Fundarstjórin vísti á, at fráboðan av aðalfundardegi skal verða send limunum í seinasta lagi 60 dagar fyri fundin og er henda send sum teldubræv hin 6. januar 2025, tvs. meira enn 60 dagar áðrenn aðalfundin, 8. mars 2025.

Formlig innkalling til aðalfundin skal sendast út í minsta lagi 7 dagar frammanundan við dagsskrá og øðrum skjølum, sum hava týdning fyri fundin og er hetta gjørt í teldubrævi 28. februar 2025, sum er 8 dagar áðrenn aðalfundin.

Ongar viðmerkingar vóru frá fundarluttakarunum til innkallingina, og vísandi til at innkalling var farin fram samsvarandi viðtøkur FSF's og meiri enn helvtin av limunum vóru møttir, staðfesti fundarstjórin tí, at aðalfundurin var lógligur og viðtøkuførur.

Fundarstjórin gjøgnumgekk síðani fundarskránna og vísti á at sambært grein 33 í viðtøkunum skal aðalfundarfrágreiðing frá undanfarnum aðalfundi bert leggjast fyri aðalfundin til góðkenningar um limur stundisliga hevur sett fram mótmæli ímóti aðalfundarfrágreiðingini og tá tað ikki er tilfellið fyri aðalfundarfrágreiðingini fyri 2024, so skal hon ikki viðgerðast á hesum aðalfundi.

Tí skjeyt fundarstjórin upp at taka pkt. 6 av skrá og tá eingin hevði viðmerkingar til hetta, varð pkt. 6 tikið av skrá. Eisini ynskti fundarstjórin at pkt. 7 varð viðgjørt undir pkt. 3 og varð hetta einmælt viðtikið. Fundarstjórin spurdi um viðmerkingar annars vóru til dagsskránna. Tað vóru tað ikki, og dagsskráin varð síðan við nevndu broytingum einmælt góðkend.

---

## 3. Forsetin greiður frá virksemi FSF's í farna ári.

**Formansfrágreiðing 2024**
*Christian F. Andreasen, FSF forseti*

Føroyskur fótbóltur er í støðugari menning og ongantíð hevur virksemið verið meira umfatandi. Serliga gleðiligt er at síggja, at luttøkan millum børn og ung er methøg – bæði í mun til tal av leikarum og liðum.

Tað er tí við gleði og stoltleika, at eg sum forseti fyri Fótbóltssambandi Føroya hyggi aftur á fótbóltsárið 2024.

**Fíggjarstøðan**
FSF er væl fyri fíggjarliga og hevur ein sunnan rakstur. Virksemið er støðugt vaksandi og neyv fíggjarstýring er tí grundleggjandi fyri at tryggja fíggjarliga burðardyggan rakstur.

Í 2024 vóru samlaðu inntøkur hjá FSF 74,5 mio. kr. Útreiðslurnar við stuðulsjáttanum vóru tilsamans góðar 73,8 mio. kr.

Úrslitið fyri 2024 var tí eitt yvirskot upp á 670.456 kr.

Eginognin var við árslok 29.913.410 kr. Likviditetur felagsins er góður.

**Fíggjarætlan 2025**
FSF er í 2025 vertur fyri stórari EM endakapping fyri U17 landslið við gentum. Talan er um størstu altjóða fótbóltskapping, sum nakrantíð er fyriskipað í Føroyum.

Kappingin kemur ikki at hava ávirkan á samlaða ársúrslitið, sum er mett til yvirskot á 1 mió. kr.

Samlaði kostnaðurin fyri EM endakappingina er mettur til uml. 15 mió. kr.

| **Fíggjarætlan** | **2025** |
|---|---:|
| Inntøkur tilsamans | 82.318.999 |
| Kostnaður tilsamans | -51.546.244 |
| Fyrisitingarkostnaður tilsamans | -29.677.709 |
| Rentukostnaður | -72.000 |
| **Ársúrslit** | **1.023.046** |

**Umsitingin**
Kristin Dam Ziska varð í januar 2024 settur í starv sum aðalskrivari í FSF. Sum liður í leiðsluskiftinum, varð nýggjur bygnaður gjørdur fyri FSF fyrisitingina. Í nýggja bygnaðinum verður leiðsla, fíggjarstýring, kappingarfyrisiting og marknaðarføring raðfesta.

Eftir broytingina er FSF fyrisitingin skipað í fýra deildum við serstøkum leiðarum: Marknaðarføring og samskifti; Fyrisiting og landslið; Kappingar og dómarar; Fótbóltur og menning.

**HatTrick stuðul frá UEFA**
Seinastu árini hevur FSF latið feløgunum stuðul til íløgur í vallarviðurskifti. Starvsnevndin samtykti í 2024 at halda fram og útbyggja verandi skipan.

Komandi Hattrick VI skipan hjá UEFA er fyri tíðarskeiðið 2024-2028. Samlaða upphæddin úr skipanini til FSF íløgur er 37 mió. kr.. Av hesi upphædd hevur starvsnevndin avsett 12,25 mió. kr. til stuðul til feløgini.

Í nýggju Hattrick VI skipanini kunnu feløg og kommunur søkja um stuðul til nýggj ljós, nýtt graslíki og felagshús/skýli. Hvør verkætlan kann fáa stuðul upp til 600.000 kr.

Í 2024 varð játtaður stuðul til hesar verkætlanir:

- Miðvágur. Nýggjur vøllur
- Sørvágur. Nýggjur vøllur
- Djúpumýra, Klaksvík. Nýggjur vøllur
- Ovari Vøllur, Tórshavn. Nýggj vallarljós

**MAFF stuðul, Stjørnufótbóltur og nýggj solidaritetsskipan**
Seinastu mongu árini hevur FSF latið stuðul til feløgini umvegis sokallaðu MAFF og Stjørnufótbóltsskipanirnar.

Endamálið við MAFF stuðlinum hevur verið at styrkja fyrisitingarliga partin av feløgunum. Peningurin skuldi nýtast til fyrisiting av felagnum, og kundi eitt nú brúkast til formansløn, samskiparaløn, bókhaldara, grannskoðara, loyvisumsiting o.l.

Størnufótbóltsskipanin hevur stuðla feløgunum í at hava munagóð ungdómstilboð. Við skipanini hevur FSF stuðla feløgunum fíggjarliga við at seta høvuðsungdómsvenjarar, og venjarar til U11 og U13 lið við gentum og dreingjum. Somuleiðis hevur verið latin serligur stuðul knýttur at talið av skrásettum ungdómsleikarum.

Grundarlagið fyri Stjørnufótbóltsskipanini og MAFF skipanini broyttist tó munandi við nýggju samstarvsavtaluni millum UEFA, ECA og European Leagues fyri tíðarskeiðið 2024-27.

Nýggja avtalan hevur við sær munandi vøkstur í solidaritetsgjøldum til feløgini.
Samlað er talan um ein vøkstur á umleið 80%.

Nýggja solidaritetsskipanin hjá UEFA er tó bert fyri feløgini, sum eru umboðaði í bestu deildini hjá monnum. Hetta hevur avbjóðingar fyri føroyskan fótbólt, tí solidaritetsgjaldið frá UEFA hevur áður verið deilt út til øll 17 limafeløgini umvegis Stjørnufótbóltsskipanina.

FSF hevur tí arbeitt við nýggjari FSF solidaritetsskipan, sum skal stuðla feløgunum, sum ikki luttaka í bestu mansdeildini.

Í tøttum samstarvi við feløgini er gjørd skipan, sum hevur sum endamál at tryggjar haldføri í øllum føroyskum fótbólti.

Í stuttum lata feløgini í meistaradeildini hjá monnum lut av sínum UEFA solidaritetsgjaldi (í miðal 19,2%) til solidaritetsskipan fyri feløgini í lægri deildunum. Afturat hesum letur FSF um 3 mió. kr. í solidaritetsskipanina. Hetta er stuðul, sum áður er latin til MAFF skipanina, dómarastuðul til betrideildina hjá monnum, umframt nýggjur stuðul.

Útgjaldið er býtt sundur í grundgjald og aktivitetsgjald. Grundgjaldið er treytað av hvørji deild besta mansliði hjá felagnum luttekur í, meðan aktivitetsgjaldið er knýtt at talið av skrásettum ungdómsleikarum. Uppflytarabonus verður latið til feløgum, sum flyta úr 1. deild í Betrideildina og úr 2. deild í 1. deild.

Nýggju solidaritetsskipanirnar eru knýttar at loyvisskipanini, har treyrirnar verða ásettar. Treytirnar eru í flestu førum líkar teimum í gomlu stjørnufótbóltsskipanini.

**Landskappingin**
Í Betri Deildini hjá monnum vann Víkingur sannførandi gull. KÍ vann silvur, meðan HB vann bronsu.

Aftur í 2024 luttóku átta lið í Betri Deildini hjá kvinnum. NSÍ vann meistaraheitið, KÍ silvur og Víkingur bronsu.

Í 2024 vóru 456 lið tilmeldaði í landskappingini, sum er fleiri enn árið fyri. Samanborið við undanfarin ár, vóru fleiri leikarar skrásettir í 2024, tí bæði hjá dreingjum U15 og gentum U16 valdu fleiri lið at spæla heilan vøll í 2024. 317 lið vóru tilmeldað innan mansfótbólt, og 139 lið innan kvinnufótbólt.

Tilsamans 3.930 børn í aldursbólkinum 5 til 17 ár vóru skrásett í 2024,1.467 gentur og 2.463 dreingir. FC Hoyvík hevði flest skrásettar leikarar í aldursbólkinum 5 til 17 ár, tilsamans 421 leikarar, 150 gentur og 271 dreingir.

| | tal av gentum | tal av dreingjum | Tal av leikarum (5-17 ár) tilsamans |
|---|---|---|---|
| **KÍ** | 101 | 234 | 335 |
| **Víkingur** | 91 | 170 | 261 |
| **ÍF** | 103 | 119 | 222 |
| **NSÍ** | 137 | 177 | 314 |
| **B68** | 92 | 107 | 199 |
| **Skála** | 112 | 132 | 244 |
| **EB/Streymur** | 78 | 159 | 237 |
| **07 Vestur** | 63 | 128 | 191 |
| **MB** | 37 | 40 | 77 |
| **FC Hoyvík** | 150 | 271 | 421 |
| **HB** | 106 | 246 | 352 |
| **B36** | 108 | 251 | 359 |
| **AB** | 97 | 131 | 228 |
| **B71** | 41 | 67 | 108 |
| **Royn** | 40 | 36 | 76 |
| **TB** | 44 | 85 | 129 |
| **FC Suðuroy** | 67 | 110 | 177 |
| **Tilsamans** | **1.467** | **2.463** | **3.930** |

**Steypakappingin**
Steypafinalurnar blivu aftur í 2024 leiktar yvir fleiri vikuskiftir.

Finalan um Løgmanssteypið 2024 var millum B36 og HB. Eftir loknan dyst og longda leiktíð var støðan 2-2. Tí bleiv finalan avgjørd við brotssparkskapping, sum HB vann.

Í steypakappingini hjá kvinnum møttust NSÍ og Víkingur. NSÍ vann 4-1

**Evropeiska luttøkan hjá feløgunum**
Í 2024 luttøku KÍ, HB. Víkingur og B36 í UEFA kappingunum fyri feløg hjá monnum.

Í kappingini hjá kvinnum luttók KÍ sum meistaralið.

**Dómaraøkið**
Í 2024 vóru 43 dómarar og hjálpardómarar í Úrmælingabólkinum. Tíverri er ongin kvinna í úrmælingabólkinum, tað gleðiliga er tó, at ein kvinna hevur dømt í Betrideildini hjá kvinnum í 2023 og 2024. Eygleiðarar vóru 13 í tali.

**Dómaraskeið**
Nýggju nýggir dómarar tóku prógv í 2024. Tríggir frá B71, tveir frá Royn, tveir frá FC Hoyvík, ein frá AB og ein frá NSÍ.

13 dómarar og hjálpardómarar luttóku á C- og á B-dómaraskeiðunum 2024.

**VAR**
VAR er blivin ein natúrligur partur av døming í flestu londum. Meginparturin av UEFA limalondunum brúka VAR í heimligu kappingum. FSF hevur avgjørt, at VAR skal setast í verk í Føroyum. Tann tilgongdin er byrjað. Ætlanin er, at fyrstu dystir við VAR verða leiktir seinni í 2025.

**Altjóða døming**
Føroyar hava tveir dómarar og fýra hjálpardómarar á FIFA listanum.

Dómarar eru Jóhan Hendrik Ellefsen og við ársbyrjan 2024 kom eisini Heini Ziska Viðoy á listan. Hjálpardómarar eru Dan Højgaard, Jan Hermansen, Jørleif Djurhuus og í 2024 kom eisini Jógvan Breckman á listan.

**Heiður til dómara**
Á Ítróttarfagnaðinum 2024 hjá ÍSF varð Heiðursskjal Poul E. Petersens latið dómara Niklas á Líðarenda. Heiðursskjalið verður latið persóni, sum hevur virkað fyri at fremja føroyskan ítrótt á serligan hátt í ein mansaldur. Í 2024 dømdi Niklas átta dystir. FSF ynskir Niklasi hjartaliga til lukku við heiðrinum.

**Venjaraútbúgvingin**
Tal av luttakarum á venjaraskeiðum í 2024

| C1 | C2 | B3 | B4 /B-prógv | A-prógv |
|---|---|---|---|---|
| 44 | 20 | 0 | 18 | 13 |

Útbúgvingarárið 2024 hilnaðist sum heild sera væl. C1 skeið vórðu hildin í feløgum kring landið (á Sandi, í Klaksvík og í Hoyvík, umframt, at eitt skeið var í FSF húsinum). 20 luttakarar komu ígjøgnum C2 skeiðið í februar. Tíverri varð tilmeldingin til B3 skeiðið í november ikki nóg høg og tískil bleiv skeiðið av ongum. B4 skeiðið var í tíðarskeiðnum frá februar til juni og fingu 18 menn UEFA B prógv í 2024.

Allir 13 luttakararnir á A venjaraútbúgvingini, 10 menn og tríggjar kvinnur komu á mál við útbúgvingini í oktober 2024.

Ráðstevnan um barna- og ungdómsfótbólt var 1. og 2. mars 2024. B36 húsið og Tórsvøllur vóru sum vant karmar um ráðstevnuna. Høvuðsnavnið hesaferð var Håkon Grøttland úr Noregi, sum hevði framløgur og venjingar, umframt at føroysk innsløg eisini vóru á skrá. Umleið 80 luttakarar tóku lut á ráðstevnuni.

Tvey impulsskeið vóru í 2024. Í februar greiddi Igor Ardoris úr Svøríki frá um mentala venjing, og vóru tað á leið 50 luttakarar sum lýddu á. Árliga skeiðið Dýra biðiðdag bleiv avlýst, tí instruktørurin fekk forfall, men tað eydnaðist at fáa Nils Nielsen á vitjan til eitt impulsskeið í september. Eisini hetta varð væl vitjað við umleið 50 luttakarum.

Viðvíkjandi málmansvenjaraútbúgvingum, so var ætlanin at hava eitt serligt C skeið kallað málmansvenjaraleiðin, men undirtøkan var ov lítil.

Í 2025 er ætlanin at gjøgnumføra eina heila samanhangandi UEFA GK B útbúgving.

Nýggja átakið "leikaraleiðin", sum er ætlað fyrrverandi og núverðandi top leikarum, fekk sera góða móttøku. Heili 32 luttakarar byrjaðu skeiðið í november og komu á mál í januar 2025. Leikaraleiðin er ein samanseting av C1-C2-B3 skeiðunum.

Árliga instruktørskeiðið var 19. og 20. januar. Arbeitt hevur verið við at rekruttera fleiri instruktørar og tískil vóru 30 luttakarar til skeiðið. Norðmaðurin Trond Nordsteien undirvísti á skeiðnum, umframt at fleiri videoframløgur vóru, m.a. frá Lars Friis, hjálparvenjara í Sparta Prague, Thomas Jansen úr Belgia, umframt James Rowberry frá fótbóltssambandinum í Wales.

Í sambandi við framleiðslu av føroyskum undirvísingartilfari hevur FSF sett eykað arbeiðsorku av til hetta arbeiði, og hevði hetta við sær, at C parturin nú nærum er liðugur, og byrjað verður uppá B útbúgvingartilfarið á vári 2025.

**Fótbóltsdeildin**
Í nýggja bygnaðin í FSF fyrisitingini er fótbóltsdeildin sett saman av landsliðsvenjarum, umframt serfrøðingum innan ávís øki, t.d. fysiskum venjara.

Skipað varð fyri temakvøldum fyri venjarum hjá U11 og U13. 23 apríl vóru á leið helvtin av feløgunum savnað í Fuglafirði, og 30. apríl var tiltakið á Tórsvølli við hinum helminginum av feløgunum.

Eins og undanfarin ár varð skipað fyri fundum við høvuðsungdómsvenjarunum tvær ferðir, umframt at høvuðsungdómsvenjararnir vóru á námsferð í Danmark í døgunum 6. til 10. mars. Vitjað var í FC Nordsjællandi, Lyngby Boldklub og HB Køge, og vóru ein rúgva av venjingum, umframt fyrilestrum á skránni. Ein sera væleydnað vitjan í Keypmannahavn.

Í mars mánað vóru Føroyar vertir fyri EM undankappingini fyri U17 gentur. Hini londini í bólkinum vóru Rumenia, Litava og Georgia. Í sambandi við kappingina bleiv skipað fyri

tveimum venjaratiltøkum. 17. mars savnaðust allir venjarar hjá Betri kvinnum, 1.deild og U16 venjarar til at umrøða menningina av kvinnufótbóltinum. Fyriestrar vóru frá A-landsliðsvenjaranum, Signe Pries Andersen, og hevði fysiski venjarin, Eli Leifsson eisini eina framløgu.

Til seinasta dystin, sum varð spældur 23. mars bleiv skipað fyri verkstovu í samstarvi við FIFA, har menningin av úrvalsleikarum í breiðari merking var á skrá. Bæði tiltøkini vóru væl vitjað og fleiri góð hugskot spurdust burturúr.

Gjøgnum alt 2024 hevur verið skipað fyri WU15 / U15 úrvalsvenjingum mikudagar, sum hava verið á Tórsvølli og á Svangaskarði, umframt at felagstiltak varð skipað. Tilboðið um úrvalsvenjing bleiv útbygt til eisini at fevna um WU16 / U16 aldursbólkin, har venjingar vóru á Tórsvølli á leið triðju hvørja viku.

**Safeguarding– trygd og trivnaður í føroyskum ítrótti**
Arbeiðið við at gera eina heimasíðu um safeguarding fyri føroyskan ítrótt helt fram í 2024.

Í februar varð skipað fyri eini verkstovu fyri fólk í føroyskum ítrótti. Tine Vertommen, úr Belgia, varð bjóðað til Føroya at standa fyri verkstovuni. Tine er Phd í safeguarding, og hevur m.a. staðið fyri tí størstu evropeisku kanningini um evnið. 42 fólk luttóku á verkstovuni.

Verkstovan gav góðan íblástur til víðari menning við heimasíðuni, og í november 2024, varð síðan loksins almannakunngjørd.

Heimasíðan er ætlað øllum í føroyska ítróttaheiminum.

Betri Trygging er høvuðsstuðul. www.trygguritrottur.fo

**Parasport tilboð**
Børn
Venjingartilboðið fyri børn við menningartarni í aldrinum 8-12 ár kallast "Fótbóltur fyri øll". B36 hevur staðið fyri venjingunum og tað helt áfram í 2024. Vant varð eina ferð um vikuna í tíðarskeiðnum apríl-oktober.
Umleið átta børn, gentur og dreingir, tóku lut í venjingunum, sum hava verið í Gundadali sunnumorgnar.

Vaksin
Tilboðið til vaksnar leikarar við menningartarni, við venjarum úr HB, helt fram til páskir 2024. Umleið 12 leikarar hittast í løtuni eina ferð um vikuna til venjing á niðara vølli í Gundadali.

Tiltøk í samband við landsdyst hjá kvinnum
Seinastu tvey árini hevur verið skipað fyri U9 venjing saman leikarum og venjarum á kvinnulandsliðnum, og hetta hevur eydnast sera væl. Bæði árini hava afturmeldingarnar frá luttakarum og foreldrum verið góðar. Tí varð aftur í 2024 skipað fyri U9 venjingum fyri bæði

gentur og dreingir í samband við ein heimadyst hjá kvinnulandsliðnum síðst í mai. Venjingin var á Tórsvølli og heili 200 børn tóku lut í venjingunum.

**Fótbóltsskúlar**
Aftur í 2024 skipaði FSF fyri fótbóltsskúlum kring landið, og aftur í ár vóru teir fýra í tali.

Av tí, at vøllurin við Djúpumýru bleiv skiftur um sama mundið, so var bert ein vøllur tøkur til fótbóltsskúlan, og tí var markið sett til 120 luttakarar. Skúlin í Klaksvík var fullteknaður nakrar dagar innan tilmeldingarfreistin.

Tað var ikki eins góð undirtøka til hinar tríggjar fótbóltsskúlarnar, sum undanfarin ár. Hetta kemst møguliga av, at fýra føroysk feløg skipaðu fyri egnum fótbóltsskúla. Staðfestast kann, at útboðið av fótbóltsvirksemi í summarferiuni er stórt, og tað er at fegnast um.

Tað luttóku tilsamans 447 børn í ár, samanborið við 511 børn í fjør.

| | Fyriskipari | Dreingir | Gentur | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| Klaksvík 21. og 22. juni | KÍ | 89 | 32 | 121 |
| Havn 28. og 29. juni | HB | 98 | 31 | 129 |
| Toftir 2. og 3. aug | B68 | 62 | 21 | 83 |
| Hoyvík 2. og 3. aug | FC Hoyvík | 94 | 20 | 114 |
| Tilsamans | | 343 | 104 | 447 |

**Grassrootsvikan**
Árliga grassrootsvikan var í døgununum 23. - 29. september. Tiltakið Bóltur&Spæl, ið nú er blivið eitt afturvendandi tiltak, var eisini á skránni í ár. Tiltakið er fyri børn, sum eru 5-6 ár (fødd í 2018 og 2019). Endamálið er at geva børnunum eina góða og stuttliga venjing, sum øll kunnu luttaka í.

Allir dagstovnar í Føroyum fingu innbjóðing. Tiltakið Bóltur&Spæl var hildið í fimm ymiskum oyggjum, og var stak væl eyðnað.

635 barnagarðsbørn luttóku saman við uml. 160 starvsfólkum og 150 skúlanæmingar luttóku sum hjálparfólk.

Saman við Parasport varð eisini skipað var fyri einum fótbóltsfestivali á Tórsvølli fyri næmingum í serbreytunum á miðnámi. Uml 60 næmingar luttóku frá Glasi, Kambsdali og úr Klaksvík, umframt næmingar frá Rásini í Runavík.

**Playmakers – nýtt tilboð til gentur**
Í november 2024 fór Playmakers loksins av bakkastokki. Playmakers, ið er eitt venjingarátak ætlað gentum í aldrinum 5-8 ár, er eitt samstarv millum UEFA og Disney. FSF hevur avgjørt, at Playmakers er eitt innandura tilboð um veturin, so tað kemur afturat teimum vanligu U7 venjingunum í feløgunum, sum vanliga eru í summarhálvuni.

Playmakers er eitt øðrvísi fótbóltstilboð til heilt ungar gentur, sum ongantíð hava roynt fótbólt, og í stuttum er talan um eina samanrenning av søguforteljing, rørslum og menning av ymiskum sosialum førleikum. Spølini í venjingartímunum taka útgangsstøði í søgugongdini úr einum Disneyfilmi. Hvørt umfar av Playmakers er 8-10 venjingar.

Tað varð skipað fyri einum lítlum venjaraskeiðið í september, og í november var loksins klárt at byrja í tveimum økjum – í Vágum og í Suðuroynni. Í Vágum vóru venjingarnar í fimleikahøllini á Giljanesi, og vóru tað venjarar frá bæði MB og 07Vestur, ið stóðu fyri. Í Suðuroynni vóru venjingarnar í høllini í Trongisvági, og her vóru tað venjarar úr TB, ið stóðu fyri. Tað vóru 13 gentur meldaðar til í hvørjum stað.

Fyrst í 2025 varð skipað fyri einum venjaraskeiðið afturat. Í februar 2025 byrjaðu seks nýgg Playmakers sentur. Á Argjum, í samstarv við AB, í Havn í samstarv við B36, á Sandi í samstarv við B71, í Sundalagnum í samstarv við EB/Streym, í Fuglafirði í samstarv við ÍF og í Klaksvík í samstarv við KÍ. Í mars 2025 eru venjarar aftur klárar at taka eitt tørn í Suðuroynni og í Vágunum.

**Landsliðsfótbóltur**
Í 2024 spældi A-landsliðið hjá monnum 10 landsdystir. Í UEFA Nations League var føroyska landsliðið í deild C, bólki 4, sum endaði við, at Føroyar fingu 6 stig. Tríggjar javnleikir og ein sigur. 1-1 heima móti Norðurmakedónia, 2-2 heima móti Armenia, 1-1 heima móti Lettlandi og vunnu 1-0 á útivølli móti Armenia. Eisini luttók manslandsliðið í Baltic Cup, umframt tveir venjingardystir móti Liktinstein og Danmark.

Eftir landsdystirnar í oktober gjørdu Håkan Ericson, landsliðsvenjari, og FSF semju um at enda samstarvið í úrtíð. Håkan Ericson var venjari fyri føroyska landsliðið í 48 dystum frá mars 2020 til oktober 2024. Millum hæddarpunktini vóru minniligi sigurin móti Turkalandi á Tórsvølli og góðu Nations League kappingarnar, har liðið vann pláss í C deildini. FSF takkar Håkani fyri avrikini og gott samstarv.

Nýggjur landsliðsvenjari er Eyðun Klakstein. Afturat sær hevur hann Atla Gregersen sum hjálparvenjara. Eyðun og Atli hava longu víst hegni á U21 landsliðnum við sera góðum úrslitum, umframt flottu avrikini við A-landsliðnum í november 2024.

Avtalurnar við Eyðun Klakstein og Atla Gregersen eru galdandi til endan av 2026.

Kvinnurnar spældu 10 landsdystir í 2024. Í EM undankappingini fingu kvinnurnar 9 stig. Tær vunnu 4-0 heima móti Andorra, vunnu 2-1 heima á Montenegro og vunnu 4-0 á Andorra á útivølli. Eisini luttóku kvinnurnar í Baltic Cup í 2024. Tær taptu fyrsta dystin móti Lettlandi 2-1, vunnu síðani seinna dystin 2-1 móti Litava, og endaðu sostatt sum nr. 3 í kappingini. Kvinnurnar spældu tveir venjingardystir í 2024 móti Malta og Albania.

Signe Pries Andersen takkaði fyri seg eftir Baltic Cup. Pætur S. Clementsen er settur sum fyribils venjari hjá kvinnunum, afturat sær hevur hann fingið Jacobu Langgaard sum hjálparvenjara.

U21 landsliðið spældi fimm dystir í 2024, tríggjar heima og tveir úti. U21 liðið fekk trý stig í hesum dystum, tá teir heima vunnu 1-0 á Belarus. Føroyar endaðu á fjórða plássi í bólkinum við 10 stigum.

Í 2024 leiktu ungdómslandsliðini 50 landsdystir. FSF hevur U15, U16, U17 og U19 landslið fyri gentur og dreingir. U15 og U16 liðini spæla venjingardystir/ menningarkappingar, meðan U17 og U19 spæla bæði venjingardystir/ menningarkappingar og undankappingardystir.

**Framtíðin**
Seinasta árið havi eg, saman við aðalskrivaranum, verið á vitjan hjá øllum okkara 17 limafeløgum. Tað hevur verið ótrúliga lívsjáttandi at uppliva, hvussu fótbólturin blómar um alt landið. Við góðum ungdómsarbeiði hava tit tryggja, at vit longu nú hava rokkið okkara høvuðsmáli í menningarætlanini, nevniliga at økja um talið av virknum fótbóltsleikarum við 20 prosentum í mun til 2021

Samhaldsfesti, ein av grundsúlunum í okkara felagsskapi, varð sannførandi staðfest, tá feløgini tóku týðandi avgerð í sambandi við nýggja FSF solidaritetsskipan. Eg fegnist um at vera forseti í einum felagsskapi, har vit síggja tað størra endamálið, har vit hjálpa hvørjum øðrum fyri saman í felag at mennast.

Mítt hjartamál hevur altíð verið at fáa fleiri børn og ung at spæla fótbólt - og skulu tey trívast og mennast, so er tað týdningarmikið, at tey hava góðar umstøður við góðum venjarum.

Við nýggju solidaritetsskipanunum tryggja vit haldføri í føroyskum fótbólti og menningina av barna og ungdómsfótbólti í øllum feløgum. Vit betra kappingarføri millum deildir og fíggjarliga gundarlagið hjá feløgum í 1. og 2. deild.

Núverandi strategi gongur á seinasta ári. Í hesum strategitíðarskeiðinum hava vit ment okkum nógv innan barna og ungdómsfótbólt, har serligur dentur hevur verið á breidd. Hetta skulu vit halda fram við, men eg haldi, at tíðini eisini er búgvin at leggja meira orku í tey bestu talentini.

Á evnisdegi fyrr í ár viðgjørdu vit, feløgini og FSF, saman okkara Leikaramenning. Hetta arbeiðið heldur fram, og úrslitini verða staðfest í nýggju strategini, sum verður tilevnað, við týðandi íkasti frá feløgunum, komandi árið

FSF og føroyskur fótbóltur hava havt stóra framgongd. Henda menningin verður í stóran mun framd í feløgunum, og eg eri tykkum ómetaliga takksamur fyri ótroyttiliga arbeiðið, tit øll gera fyri føroyskan fótbólt kring alt landið.

Vit eiga at halda fast í hesi gongd og greiða okkara málsetningar í tøttum samstarvi – feløgini og FSF.

Aðalfundur Fótbóltssamband Føroya 8. mars 2025

12/17

**Endi**
Eg fari at enda við at takka feløgunum, nevnd, starvsfólki, venjarum, tekniskum starvsfólki og øllum tykkum, sum á einhvønn hátt hava verið við til at stíga enn eitt stig fram á leiðini. Tøkk til stuðlar fyri týdningarmikið og gott samstarv.

Somuleiðis ein tøkk til fjølmiðlar og áskoðarar, sum á tykkara hátt eru við til at gera fótbólt til nakað serligt.

Eisini skal eg takka øllum, sum hava stuðlað Fótbóltssambandi Føroya í farna ári.

Vit takka Bakkafrost, Atlantic Airways, Smyril Line fyri stuðul til landsliðini.

Harafturat ein serlig tøkk til Betri, sum umframt at stuðla kvinnulandsliðnum, saman við Smyril Line, eisini stuðlar Meistaradeildina hjá bæði monnum og kvinnum.

Loksins vil eg takka øllum teimum nógvu, sum á ein ella annan hátt varða av føroyskum fótbólti, fyri hjálpsemi í 2024.

Takk fyri.

**Christian F. Andreasen**
forseti

*Fundarstjórin staðfesti, at aðalfundurin hevur tikið frágreiðignina til eftirtektar við lógvabresti.*

---

## 4. Val av limum at eftirkanna fundarfrágreiðingina

Starvsnevndin skjeyt upp at velja Fróða Danielsen (FC Hoyvík) og Eyðbjørn Thomsen (FC Suðuroy) at eftirkanna fundarfrásøgnina. Einki annað uppskot varð og tá einans tveir kandidatar vóru til tveir sessir, vórðu teir valdir við lógvabresti.

---

## 5. Val av eftirlitsfólki

Starvsnevndin skjeyt upp at velja Jóhannu Jancyardóttir (B71) og Jóhannes Hansen (EB/Streymur) sum eftirlitsfólk á aðalfundinum. Einki annað uppskot varð og tá einans tveir kandidatar vóru til tveir sessir, vórðu tey vald við lógvabresti

---

## 6. Góðkenning av fundarfrágreiðing frá undanfarna aðalfundi

Tikið av skrá – sí undir punkt 2 í skránni.

Aðalfundur Fótbóltssamband Føroya 8. mars 2025

13/17

## 7. Ársfrágreiðing (sum lýsir virksemið síðani seinasta aðalfund)

Forsetin lýsti virksemi hjá FSF í 2024 undir punkt 3 í skránni. Í hesum sambandi var eisini ársfrágreiðingin send limunum fyri aðalfundin.

## 8. Framløga og góðkenning av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu fyri farna roknskaparár

Óli Joensen frá Grannskoðaravirkinum Januar legði fram grannskoðan roknskap.

Roknskapurin hjálagdur.

Tað vóru ongar viðmerkingar ella spurningar til roknskapin

*Fundarstjórin setti síðani uppskotið til ársroknskap undir atkvøðugreiðslu, og varð hann einmælt góðkendur*.

## 9. Uppskot frá Starvsnevndini

**Lógir FSF**
Starvsnevndin legði uppskot fyri aðalfundin at broyta Grein 41, 43, 44, 46, 47 og 48 Lógir FSF.

Við verandi lógum eru hesar nevndir mannaðar við tveimum limum úr starvsnevndinu umframt trimum øðrum limir.

- Kappingarnevndin
- Útbúgvingar og menningarnevndin
- Landsliðsnevndin
- Kvinnunevndin
- Grassroots og ungdómsnevndin

Við lógarbroytingini verður tað ikki longur eitt krav, men heldur ein møguleiki, at velja uttanhýsis limir, sum ikki eru í starvsnevndini, í føstu nevndir. Við nýggju viðtøkunum verður sostatt smidligari hjá starvsnevndini at manna hesar nevndirnar.

Fundarstjórin spurdi um tað vóru spurningar ella viðmerkingar til uppskotið. Tað vóru tað ikki. Síðani varð uppskotið sett undir atkvøðugreiðslu, og varð tað einmælt viðtikið við øllum atkvøðum fyri.

## 10. Val av óheftum grannskoðara eftir uppskoti frá Starvsnevndini

Starvsnevndin skjeyt upp at afturvelja P/f Grannskoðaravirkið JANUAR, Tórshavn og tá einki annað uppskot varð, varð Grannskoðaravirkið JANUAR einmælt afturvalt við lógvabresti (applaus).

---

## 11. Val av Forseta og limum í Starvsnevndina

**Val av Forseta**

| | |
|---|---|
| Christian F. Andreasen | Tekur við afturvali |
| John Eystberg | |

Til valið hevði hvørt felag tveir atkvøðuseðlar. Ein atkvøða kann gevast á hvørjum atkvøðuseðli.

Fyri at valevni skal verða valt í fyrsta valumfari krevst, at meira enn 50% av skrásettum og gildugum atkvøðum atkvøða fyri í fyrsta valumfari. (Valreglugerðin Grein 1, stk. 3)

Valevni skal tí í minsta lagi fáa 18 atkvøður í fyrsta umfari fyri at verða valt. Stendur á jøvnum, verður umval millum tey, ið standa á jøvnum, og eftirfylgjandi lutakast, um tað framvegis stendur á jøvnum. (Valreglugerðin Grein 1, stk. 5)

Úrslitið av valinum var:

| | |
|---|---|
| Christian Andreasen | 29 atkvøður |
| John Eystberg | 3 atkvøður |

Christian Andreasen fekk sostatt meir enn 50% av atkvøðunum og var tí valdur til FSF forseta fyri 4 ár.

**Val av Starvsnevndarlimum (3 limir)**

| | |
|---|---|
| Fríðin Ziskason | Tekur við afturvali |
| Jóannes Prestá | |
| Róin Schrøter | Tekur við afturvali |
| Sólrun Henriksdóttir Sørensen | |

Sambært lógum FSF skulu bæði kyn veljast, tá val er til starvsnevnd FSF (Valreglugerðin Grein 2, stk 3). Bert ein kvinna varð uppstillað, og Sólrun Henriksdóttir Sørensen varð tí vald við lógvabresti (applaus).

Reglugerðin til val til starvsnevndina er hin sama sum til val av forseta.

Fyri at valevni skal verða valt í fyrsta valumfari krevst, at meira enn 50% av skrásettum og gildugum atkvøðum atkvøða fyri í fyrsta valumfari. (Valreglugerðin Grein 1, stk. 3)

Valevni skal tí í minsta lagi fáa 18 atkvøður í fyrsta umfari fyri at verða valt. Stendur á jøvnum, verður umval millum tey, ið standa á jøvnum, og eftirfylgjandi lutakast, um tað framvegis stendur á jøvnum. (Valreglugerðin Grein 1, stk. 5)

Úrslitið av valinum var:

| | |
|---|---|
| Fríðin Ziskason | 17 atkvøður |
| Jóannes Prestá | 21 atkvøður |
| Róin Schrøter | 19 atkvøður |

Jóannes Prestá og Róin Schrøter fingu sostatt meir enn 50% av atkvøðunum og vórðu tí valir í FSF starvsnevndina fyri 4 ár.

---

## 12. Val av limum í Aga- og etiskunevndina og Yvirkærunevndina, valdir fyri 2 ár

**Aganevndin**
**Nevndarlimir vald fyri 2 ár**

| | |
|---|---|
| Birita Sandberg Samuelsen | Valevni til 1 ára skeið |
| Eli Thorsteinsson | Tekur við afturvali |
| Jóhan Troest Davidsen | Tekur við afturvali |
| Ken Nónklett | Tekur við afturvali |

Einki annað uppskot var, og vórðu omanfyri nevndu tí sum einastu kandidatar valdar við lógvabresti (applaus).

**Yvirkærunevndin**
**Nevndarlimir valdir fyri 2 ár**

| | |
|---|---|
| Durita Sigmundsdóttir Djurhuus | Tekur við afturvali |
| Høgni J. Høgnesen | Tekur við afturvali |
| Unn Krákustein | Tekur við afturvali |

Einki annað uppskot var, og vórðu omanfyri nevndu tí sum einastu kandidatar valdIr við lógvabresti (applaus).

---

## 13. Ymiskt

Tummas Lervig setti fram ynski um, at valevnini til forseta og starvsnevnd í framtíðini fáa betri møguleika at presentera seg áðrenn valið á aðalfundinum. Somuleiðs helt Tummas

Lervig, at best hevði verið, um starvsnevndin í FSF varð umboðað breitt úr øllum landinum. Tummas Lervig takkaði Fríðin Ziskason fyri gott samstarv árini, hann hevur verið í nevndini.

Fundarstjórin takkaði síðan fyri góðan fundarsið og gav orðið til forsetan, sum eisini takkaði fyri.

Forsetin nýtti høvið at ynskja Sólrun Henriksdóttir Sørensen og Jóannes Prestá til lukku við valinum, samstundis sum hann takkaði Fríðin Ziskason og Rúna Herup Olsen fyri gott samstarv í nevndini.

Loksins varð 1. ørindi í tjóðsanginum sungið.

Fundur lokin kl. 15.00

____________________________________
Ingi Højgaard, fundarstjóri

**Hjálagt:**

- Roknskapur fyri 2024
- Viðtøkur FSF's

# Lógir fyri Fótbóltssamband Føroya (FSF)

Á aðalfundinum tann 8. mars 2025 varð samtykt at gera broytingar í...

- Grein 41 / stk. 2, stk. 3, stk. 4 og stk. 9.

- Grein 43 / stk. 1

- Grein 44 / stk. 1

- Grein 46 / stk. 1

- Grein 47 / stk. 1

- Grein 48 / stk. 1



**D. FASTAR NEVNDIR**

**Grein 41. Fastar nevndir**
1. Føstu nevndirnar hjá FSF eru:

a) Fíggjarnevndin;

b) Kappingarnevndin;

c) Útbúgvingar- og menningarnevndin;

d) Dómaranevndin;

e) Landsliðsnevndin;

f) Kvinnunevndin;

g) Grassroots og ungdómsnevndin.

2. Limirnir Einans formenninir og varaformenninir í føstu nevndunum verða útnevndir av Starvsnevndini. Nevndirnar skipa seg sjálvar, tó skulu formennirnir vera limir av Starvsnevndini. Starvsnevndin kann eisini velja limir í føstu nevndirnar, sum ikki eru limir í Starvsnevndini. kunnu vera limir í Starvsnevndini undantikið tey í fíggjarnevndini og dómaranevndini.

3. Limirnir í føstu nevndunum verða útnevndir av Starvsnevndini. Formenninir, varaformenninir og limirnir í føstu nevndunum vera útnevndir fyri eitt tvey ára skeið. Starvsnevndin kann seta ella koyra tey nær sum helst uttan góðkenning frá aðalfundinum.

4. Limirnir í føstu nevndunum skulu sínamillum hava førleikarnar, vitanina, evnini og royndirnar til at avgreiða uppgávur og skyldur hjá teirra viðkomandi nevndum. Starvsnevndin skal tryggja eitt hóskandi kynsbýti og áhugamálsbýti í føstu nevndunum.

5. Hvør formaður skal umboða sína føstu nevnd og taka sær av virkseminum í samsvari við viðkomandi mannagongd, sum Starvsnevndin hevur ásett.

6. Hvør formaður ásetir fundardagar í samstarvi við avvarðandi skrivara og skal tryggja, at allar uppgávur verða framdar og geva frágreiðingar til Starvsnevndina. Fundir kunnu annaðhvørt vera persónligir ella sum videofundur.

7. Starvsnevndin og hvør fasta nevnd, sum hevur fingið loyvi frá Starvsnevndini, kann, um neyðugt, stovna eina undirnevnd at avgreiða skundmál; í slíkum føri kunnu avgerðir takast umvegis skrivligar samskiftishættir (t.d. teldupost, boð appir). Alt orðaskifti og avgerðir hjá undirnevndum skal fráboðast til viðkomandi føstu nevndina so skjótt sum tað letur seg gera.

8. Fastar nevndir kunnu seta fram uppskot til Starvsnevndina um broyting í reglugerðunum fyri teirra nevnd.

9. Undirnevndir kunna leggja mál av stórum prinsipiellum týdningi fyri Starvsnevndina til støðutakan. Undirnevndir skulu somuleiðis regluliga geva Starvsnevndini kunning um teirra virksemi.

**Grein 42. Fíggjarnevndin**
1. Í Fíggjarnevndini eru Forsetin sum formaður, varaformaður og ein annar limur.

2. Nevndin hevur hesar skyldur:
a) at hava eftirlit við fíggjarstýringini hjá FSF;

b) at ráðgeva Starvsnevndini í fíggjarligum málum og um hvussu ognir hjá FSF skulu fyrisitast; og

c) at greina fíggjarætlanina hjá FSF og roknskapirnar, ið verða fyrireikaðir av aðalskrivaranum, og letur Starvsnevndini hesar til góðkenningar.

**Grein 43. Kappingarnevndin**
1. Í Kappingarnevndini verða valdir 3 - 5 limir, ~~eru~~ ein formaður, varaformaður og upp til tríggir aðrir limir.

2. Nevndin hevur hesar skyldur:
a) at skipa fyri og at hava eftirlit við kappingunum hjá FSF samsvarandi kappingarreglunum hjá FSF;

b) at ráðgeva Starvsnevndini um kappingarviðurskifti; og

c) at skjóta upp broytingar til kappingarreglurnar til Starvsnevndina.

**Grein 44. Útbúgvingar- og menningarnevndin**

1. Í Útbúgvingar- og menningarnevndini verða valdir 3 - 5 limir, ein~~eru~~ formaður, varaformaður og upp til tríggir aðrir limir.

2. Nevndin hevur hesar skyldur:
a) at skipa fyri og at hava eftirlit við útbúgvingini av venjarum í samsvari við UEFA Coaching Convention;

b) at ráðgeva Starvsnevndini um teknisku menningina av fótbólti.

**Grein 45. Dómaranevndin**
1. Í Dómaranevndini eru formaður, varaformaður og tríggir aðrir nevndarlimir, sum helst skulu vera fyrrverandi dómarar. Teir skulu ikki hava tilknýti til nakað ávíst felag, liga (um viðkomandi), annað fótbóltssamband ella annan dómarafelagsskap (fakfelag, áhugabólk o.s.fr.) Virknir dómarar eru ikki valbærir til limaskap í Dómaranevndini.

2. Nevndin hevur hesar skyldur:
a) at skipa dómarar í hvønn bólk alt eftir meting av teirra avrikum, umframt at tey skulu taka støðu til, um dómari skal flytast upp ella niður;

b) at góðkenna útnevnan av dómarum til kappingar undir FSF;

c) at hava eftirlit við innstilling av dómarum til FIFA Refereeing International Lists í samsvari við FIFA Regulations Governing the Registration of International Match Officials;

d) at hava umsjón við at Laws of the Game verður fylgt í øllum kappingum, sum verða fyriskipaðar undir FSF;

e) at fylgja standard háttalagi fyri dómarar sum ásett av FIFA fyri at tryggja einsháttaða íverksetan av Laws of the Game;

f) at nýta einsháttaði krøv til at eftirmeta dómarar sum ásett av FIFA;

g) at velja og góðkenna altjóða dómaravenjarar (herímillum eygleiðarar, dystargreinarar og onnur fólk, sum hava beinleiðis ávirkan á avrik og menning av dómarum);

h) at góðkenna umsitingarreglur fyri dómaravirksemi.

**Grein 46. Landsliðsnevndin**
1. Í Landsliðsnevndini verða valdir 3 – 5 limir, ein ~~eru~~ formaður, varaformaður og upp til tríggir aðrir limir.

2. Nevndin hevur hesar skyldur:
a) at ráðgeva Starvsnevndini í viðurskiftum um landslið.

**Grein 47. Kvinnunevndin**
1. Í Kvinnunevndini verða valdir 3 - 5 limir, ein ~~eru~~ formaður, varaformaður og upp til tríggir aðrir limir.

2. Nevndin hevur hesar skyldur:

a) at ráðgeva Starvsnevndini um mál viðvíkjandi menningini av gentu- og kvinnufótbólti.

**Grein 48. Grassroots og ungdómsnevndin**
1. Í Grassroots og ungdómsnevndini verða valdir 3 - 5 limir, ein ~~eru~~ formaður, varaformaður og upp til tríggir aðrir limir.

2. Nevndin hevur hesar skyldur:

a) at ráðgeva Starvsnevndini um mál viðvíkjandi menningini av grassroots og ungdómsfótbólti.

**Lógir fyri FSF**

Kapittul I: **Almennar ásetingar**

Kapittul II: **Limaskapur**

Kapittul III: **Heiðursforseti og heiðurslimur**

Kapittul IV: **Skipan**
– A. Aðalfundur
– B. Starvsnevnd
– C. Forseti
– D. Fastar nevndir
– E. Fyrisiting
– F. Dømandi nevndir
– G. Loyvisnevndir

Kapittul V: **Fíggjarmál**

Kapittul VI: **Kappingar og rættindi til kappingar og tiltøk**

Kapittul VII: **Altjóða dystir og kappingar**

Kapittul VIII: **Endaligar ásetingar**

**Skilmarkingar**
Heitini niðanfyri hava fylgjandi skilmarking:
Aðalfundur: Ovasti og lóggevandi myndugleikin hjá FSF.

Ábyrgdarpersónar (Officials): Allir starvsnevndarlimir, nevndarlimir, venjarar, dómarar og hjálpardómarar, hjálparfólk og aðrir persónar við ábyrgd fyri tekniskum, læknaligum og fyrisitingarligum viðurskiftum hjá FIFA, einari konfederatión, einum felagsskapi, liga ella felagi, umframt aðrir persónar, sum hava skyldu at fylgja viðtøkunum hjá FIFA, UEFA ella FSF (fyriuttan leikarar, dystarfyriskiparar (match agents) og fótbóltsagentar).

CAS (TAS): Court of Arbitration for Sport (Tribunal Arbitral du Sport) í Lausanne (Sveis).

Felag: Limur í einum fótbóltsfelagsskapi (ið sjálvur er limur í FIFA).

Felagsskapur: Ein fótbóltsfelagsskapur viðurkendur av og limur í FIFA og viðkomandi konfederatión.

FIFA: Fédération Internationale de Football Association.

FSF: Fótbóltssamband Føroya.

Gerðarrættur: Ein óheftur privatur dómstólur, ið kemur í staðin fyri ein vanligan dómstól.

IFAB: International Football Association Board.

Konfederatión: Ein bólkur av felagsskapum viðurkendur av FIFA og frá sama heimsparti (ella líknandi landafrøðiligum øki).

Liga (League): Ein “organisatión” undir einum felagsskapi.

Limur: Fótbóltsfelag sum sambært aðalfundarsamtykt hevur limaskap í FSF.

Spælari: Ein fótbóltsspælari skrásettur í einum felagsskapi.

Starvsnevnd: Myndugleiki í FSF sum hevur yvirskipaða ábyrgd av strategi og hevur eftirlit við virkseminum hjá FSF.

UEFA: Union of European Football Associations.
Vanligir dómstólar: Almennir dómstólar, ið viðgera almennar og privatar løgfrøðiligar ósemjur.

Umboð: Ein persónur, sum hevur heimild at umboða eitt limafelag á aðalfundi hjá FSF.

Økisfelagsskapur: Ein fótbóltsfelagsskapur undir einum øðrum fótbóltsfelagsskapi.

NB: Tá víst verður til natúrligar persónar, verður hugsað um bæði kyn. Tá tosað verður um eintal, verður eisini hugsað um fleirtal og øvugt.

---

**Kapittul I. Almennar ásetingar**

**Grein 1. Løgfrøðilig eind, høvuðsskrivstova og vørumerki**
1. Fótbóltssamband Føroya (FSF) er ein privatur ikki-vinnuligur áhugafelagsskapur, settur á stovn í samsvar við føroyskari lóggávu, og er skrásettur í Tórshavn. Felagsskapurin er skipaður fyri eitt óavmarkað tíðarskeið.

2. Høvuðssætið er í Tórshavn.

3. FSF er limur í FIFA, UEFA og ÍSF.

4. Flaggið hjá FSF hevur litirnar hvítt, blátt og reytt, við búmerkinum hjá felagsskapinum.

5. Búmerkið hjá FSF er styttingin FSF við stovningarárstali og í litunum hjá flagginum.

6. Styttingin fyri Fótbóltssamband Føroya er FSF.

7. Flaggið, búmerkið, eyðkennismerkið og styttingin eru skrásett vørumerki.

**Grein 2. Endamál**
Endamálini hjá FSF eru:
a) støðugt at menna fótbóltsspælið og stuðla, skipa og hava ræðið á hesum í Føroyum, samsvarandi Fair Play og tess sameinandi, útbúgvingarligu, mentunarligu og manngóðu virðini, serliga við at fremja ungdóms- og menningarætlanir;

b) at skipa fyri almennum kappingum, vinardystum og øðrum fótbóltstiltøkum í Føroyum;

c) at gera reglur og ásetingar og tryggja, at hesar verða hildnar;

d) at verja áhugamál limanna; harundir at hjálpa limum at loysa ósemjur;

e) at virða og forða fyri brotum á viðtøkum, reglugerðum, boðum og avgerðum hjá FIFA, UEFA og FSF eins og “Laws of the Game”, og tryggja, at hesi verða vird av limunum;

f) at tryggja at fótbóltsspælið er atkomiligt og útbreitt til øll, sum vilja taka lut í Føroyum, uttan mun til kyn og aldur;

g) at virka fyri integriteti, etikki og fair play fyri at fyribyrgja mutri, doping ella óreiðilig ávirkan á dystir, ið kunnu seta í váða integritetin av dystum ella kappingum, leikarum, ábyrgdarpersónum og limum, ella hava við sær misnýtslu av fótbólti, futsal ella beach Soccer;

h) at skipa fyri e-sports kappingum og skipa tær í samsvari við reglunum hjá FSF;

i) at fremja og styrkja leiðreglur um góða virkisleiðslu (good governance) og mannagongdir á innlendis stigi og at eggja limunum til at samtykkja egnar leiðreglur um góða virkisleiðslu;

j) at fremja menning av kvinnufótbólti;

k) at hava ræðið á øllum fótbóltsdystum, sum verða spældir í Føroyum samsvarandi viðtøkur og reglugerðir hjá FIFA og UEFA;

l) at stjórna fyri altjóða ítróttarligum samstarvi innan fótbólt og at varðveita eitt gott samstarv við onnur fótbóltssambond, FIFA og UEFA;

m) at skipa fyri kappingum á altjóða og øðrum stigum.

**Grein 3. Skyldur**
FSF átekur sær:
a) at halda meginreglurnar um trúfesti, integritet og góðan ítróttaanda í huganum av fair play;

b) at fylgja galdandi reglur um Laws of the Game, sum samtyktar av International Football Association Board (IFAB), Beach Soccer Laws of the Game og galdandi reglur um Futsal Laws of the Game, eins og hesar eru settar í gildi av FIFA;

c) at til eina og hvørja tíð at eftirlíka viðtøkur, reglur, boð, avgerðir hjá FIFA og UEFA og Code of Ethics hjá FIFA, avgerðir hjá CAS, umframt føroyska lóggávu, hesar viðtøkur og aðrar lógir og reglur sum eru bindandi fyri FSF;

d) at bera seg at á ein slíkan hátt, sum er í samsvari við anti-doping reglugerðir og aðrar ásetingar í viðkomandi lóggávu;

e) at viðurkenna dómsvaldið hjá the Court of Arbitration for Sport (CAS) í Lausanne (Sveis) í øllum trætum av altjóða slagi sum viðvíkja viðtøkum ella reglum hjá FIFA og UEFA, sum ásett í viðtøkunum hjá FIFA og UEFA, og at fylgja avgerðum tiknar av CAS (íroknað avgerðir sum eru tiknar við støði í umbønum um fyribils tiltøk);

f) at bert vísa mál í evsta rættarstigi (t.e. eftir at allar innanhýsis mannagongdir hjá FSF eru troyttar) í øllum innlendis trætum viðvíkjandi viðtøkum ella fyriskipanum hjá FSF, til ein gerðarrætt í samsvari við føroyska lóg, sum tekur endaliga støðu til trætuna uttanum vanligu dómstólarnar;

g) at skipa síni viðurskifti sjálvstøðugt og at tryggja at egin viðurskifti ikki eru órímuligt ávirkaði av nøkrum triðja parti og at áseta eina mannagongd, sum tryggjar fult óheftni og integritet, tá val ella tilnevningar fara fram av limum í FSF nevndum, serliga eina mannagongd, sum er leys av eini og hvørjari óhóskandi politiskari uppíblanding ella ávirkan;

h) at tryggja at limirnir, ligur (um nøkur er), feløg, leikarar, ábyrgdarpersónar, fótbóltsagentar og dystarfyriskiparar, umvegis teirra viðtøkur, loyvi, skráseting ella í ein og hvørjum øðrum skrivligum skjali, viðurkenna og góðtaka allar omanfyri nevndu skyldur, og játta at verða bundin av og fylgja viðtøkum, reglum og boðum hjá FIFA, UEFA og FSF, umframt avgerðir tiknar av hesum.

i) at lata til FIFA og UEFA ein og hvørja tillaging av FSF viðtøkunum í eitt av almennu málunum hjá FIFA og UEFA.

**Grein 4. Mannarættindi, uttanveltastøða, ímóti mismuni og javnrættur**
1. FSF bindur seg til at virða øll altjóða viðurkend mannarættindi og skal stremba eftir at fremja verjuna av hesum rættindum.

2. FSF hevur eina uttanveltastøðu í viðurskiftum um politikk og átrúnað. Limir skulu eisini hava eina uttanveltastøðu í viðurskiftum um politikk og átrúnað og skulu tryggja sær, at teirra egnu limir hava eina uttanveltastøðu.

| 20 | Bartal Páll Klein | | | | 05.12.2006 |
| 21 | Eivind Restorff Mouritsen | | | | 14.02.2004 |
| 23 | Jákup Ludvig Thomsen | | (4) | 71 | 23.11.1997 |
| 24 | Silas Bjarnason Joensen | | | | 14.03.2008 |
| 27 | Jógvan í Skála | | | | 15.04.2008 |

| Brondby IF | | HB |
|---|---|---|
| Frederik Birk (Denmark) | Høvuðsvenjari | André Olsen (UEFA B) |
| | Hjálparvenjari | |
| | Málmansvenjari | |
| | Fysiskur venjari | |
| | Fysioterapeut | |
| | Lækni | |
| | Security person | |
| | Kitman | |

| | | |
|---|---|---|
| Endastøða | 1:0 | |
| Scorer/Min | 19 | 31 |
| BS/SM | | |

**Cautions:** HB: 17 Bartal Wardum (14); 5 Noah Mneney (22)

**BS:** Brotsspark **SM:** Sjálvmál **M:** Málmaður **L:** Liðskipari SPÆLT

## Dómaraseðil

# 2026 UEFA Europa Conference League - Second qualifying

## KÍ - Radnički 1923

## 1:0 (1:0)

Dagur/tíð: 31.07.2025 19:45 WET
Leikvøllur: við Djúpumýru / Klaksvík / Føroyar

Umfar: F

Aldursbólkur: Vaksin
Áskoðarar: 1493

Dómari: Roman Jitari (MDA)
1. hjalpardómari: Anatolie Basiul (MDA)
2. hjálpardómari: Vadim Rosca (MDA)
4. dómari: Daniel Luca (MDA)
Dómaraeygleiðari:

label.refereeAssistantExtra.short:
Delegate: Veiko Soo (EST)
Heimildarfólk:
FSF-umboð:

| Team A | KÍ | | ID | Team B | Radnički 1923 | | ID |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Sebastian Linnet John | M | 26.03.1996 | 88 | Vladimir Stojković | M | |
| 2 | Gaston Nicolas Tellechea | | 16.12.1999 | 5 | Nikola Marjanović | | |
| 5 | Deni Pavlovic | | 01.09.1993 | 8 | Mehmed Ćosić | | |
| 7 | Árni Frederiksberg | | 13.06.1992 | 9 | Stephen Chinedu | | |
| 8 | Jákup Biskopstø Andreasen | L | 31.05.1998 | 14 | Slobodan Simović | L | |
| 9 | Páll Andrasson Klettskarð | | 17.05.1990 | 17 | Alfa Baldé | | |
| 10 | Hallur Hansson | | 08.07.1992 | 25 | Danilo Mitrović | | |
| 13 | Patrik Johannesen | | 07.09.1995 | 27 | Miloš Ristić | | |
| 14 | René Shaki Joensen | | 08.02.1993 | 55 | Milutin Vidosavljević | | |
| 22 | Odmar Færø | | 01.11.1989 | 77 | Issa Bah | | |
| 23 | Jóannes Kalsø Danielsen | | 10.09.1997 | 99 | Louay Iben Hassine | | |
| | | | | | | | |
| 96 | Mark Fabricius Jensen | M | 22.11.1996 | 81 | Luka Lijeskić | M | |
| 3 | Robert Behson-Courage Williams | | 15.01.2000 | 7 | Matija Gluščević | | |
| 6 | Mads B. Mikkelsen | (13) 83 | 01.01.1960 | 10 | Kilian Bevis | (55) 69 | |
| 15 | Daniel Johansen | (14) 83 | 09.07.1998 | 15 | Milan Mitrović | | |
| 17 | Filip Brattbakk | | 24.04.2000 | 21 | Jovan Ilic | (27) 83 | |
| 19 | Dávid Biskopstø Andreasen | | 27.06.2004 | 23 | Bojan Adžić | | |
| 21 | Páll Müller | | 09.02.2008 | 32 | Nikola Bukumira | | |
| 24 | Martin Rodrigo Gonzalez | | 09.05.2003 | 44 | Bogdan Mirčetić | (17) 46 | |
| 26 | Gilli Rólantsson Sørensen | | 11.08.1992 | 50 | Tomislav Dadić | (25) 46 | |
| 32 | Claes Philip Kronberg | (23) 89 | 19.04.1987 | 80 | Luka Stankovski | (9) 69 | |
| | | | | 90 | Milan Vidakov | | |

| KÍ | | Radnički 1923 |
|---|---|---|
| Magnus Powell (UEFA PRO (U)) | Høvuðsvenjari | Fedja Dudić (Bosnia and Herzegovina) |
| | Hjálparvenjari | |
| | Málmansvenjari | |
| | Fysiskur venjari | |
| | Fysioterapeut | |
| | Lækni | |
| | Security person | |
| | Kitman | |

| | | |
|---|---|---|
| Endastøða | 1:0 | |
| Scorer/Min | 9 | 39 |
| BS/SM | | |

**Cautions:** KÍ: 8 Jákup Biskopstø Andreasen (69); 23 Jóannes Kalsø Danielsen (79); Radnički 1923: 80 Luka Stankovski (84)

**BS:** Brotsspark **SM:** Sjálvmál **M:** Málmaður **L:** Liðskipari SPÆLT

## Dómaraseðil

## 2026 UEFA Europa Conference League - Third qualifying

## KÍ - FC Neman Grodno

## 2:0 (2:0)

Dagur/tíð: 05.08.2025 19:45 WET — Umfar: 1/2F — Aldursbólkur: Vaksin
Leikvøllur: Tórsvøllur / Tórshavn / Føroyar — Áskoðarar: 2281

Dómari: Cláudio Pereira (POR)
1. hjalpardómari: Pedro Martins (POR)
2. hjálpardómari: Pedro Ribeiro (POR)
4. dómari: José Bessa (POR)
Dómaraeygleiðari:

label.refereeAssistantExtra.short:
Delegate: Milan Jankovic (BIH)
Heimildarfólk:
FSF-umboð:

| Team A | KÍ | | | ID | Team B | FC Neman Grodno | | | ID |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Sebastian Linnet John | M | | 26.03.1996 | 12 | Maksim Belov | M | | |
| 2 | Gaston Nicolas Tellechea | | | 16.12.1999 | 5 | Yegor Parkhomenko | | | |
| 5 | Deni Pavlovic | | | 01.09.1993 | 6 | Artur Nazarenko | | | |
| 7 | Árni Frederiksberg | | | 13.06.1992 | 9 | Sergei Pushnyakov | | | |
| 8 | Jákup Biskopstø Andreasen | L | | 31.05.1998 | 15 | Oleg Evdokimov | | | |
| 9 | Páll Andrasson Klettskarð | | | 17.05.1990 | 17 | Yegor Zubovich | | | |
| 10 | Hallur Hansson | | | 08.07.1992 | 20 | Ivan Sadovnichi | L | | |
| 13 | Patrik Johannesen | | | 07.09.1995 | 27 | Amantur Shamurzaev | | | |
| 14 | René Shaki Joensen | | | 08.02.1993 | 32 | Yuri Pavlyukovets | | | |
| 22 | Odmar Færø | | | 01.11.1989 | 47 | Mikhail Kozlov | | | |
| 23 | Jóannes Kalsø Danielsen | | | 10.09.1997 | 71 | Anton Suchkov | | | |
| | | | | | | | | | |
| 96 | Mark Fabricius Jensen | M | | 22.11.1996 | 1 | Artur Malievski | M | | |
| 3 | Robert Behson-Courage Williams | | | 15.01.2000 | 7 | Yuri Klochkov | | | |
| 6 | Mads B. Mikkelsen | | (13) 68 | 01.01.1960 | 8 | Yuri Pantya | | (32) 46 | |
| 11 | Jonn Johannessen | | | 30.12.2001 | 11 | Yuri Gavrilov | | | |
| 15 | Daniel Johansen | | (14) 68 | 09.07.1998 | 18 | Maksim Kravtsov | | (9) 76 | |
| 17 | Filip Brattbakk | | (9) 80 | 24.04.2000 | 24 | Andrei Yakimov | | | |
| 19 | Dávid Biskopstø Andreasen | | | 27.06.2004 | 30 | Valon Ahmedi | | (6) 68 | |
| 21 | Páll Müller | | | 09.02.2008 | 33 | Isaac Ngoma | | | |
| 24 | Martin Rodrigo Gonzalez | | | 09.05.2003 | 46 | Aleksei Legchilin | | | |
| 26 | Gilli Rólantsson Sørensen | | (22) 80 | 11.08.1992 | 50 | Aleksei Shalashnikov | | | |
| 27 | Issah Ahmed Latif | | | 29.08.2002 | 88 | Pavel Savitski | | (17) 46 | |
| 32 | Claes Philip Kronberg | | (7) 88 | 19.04.1987 | 99 | Gulzhigit Borubaev | | (71) 46 | |

Magnus Powell (UEFA PRO (U)) — Høvuðsvenjari — Igor Kovalevich (Belarus)
Hjálparvenjari
Málmansvenjari
Fysiskur venjari
Fysioterapeut
Lækni
Security person
Kitman

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Endastøða | 1:0 | | 2:0 | |
| Scorer/Min | 14 | 26 | 9 | 45[1] |
| BS/SM | | | | |

**Cautions:** KÍ: 5 Deni Pavlovic (41); 22 Odmar Færø (61)

**BS:** Brotsspark **SM:** Sjálvmál **M:** Málmaður **L:** Liðskipari SPÆLT

## Dómaraseðil

# 2026 UEFA Europa Conference League - Third qualifying

## Víkingur - Linfield FC
## 2:1 (1:1)

Dagur/tíð: 07.08.2025 19:00 WET | Umfar: 1/2F | Aldursbólkur: Vaksin
Leikvøllur: Tórsvøllur / Tórshavn / Føroyar | Áskoðarar: 565

Dómari: Luka Bilbija (BIH)
1. hjalpardómari: Amer Macić (BIH)
2. hjálpardómari: Damir Lazić (BIH)
4. dómari: Dragan Petrović (BIH)
Dómaraeygleiðari:

label.refereeAssistantExtra.short:
Delegate: Jean-Pierre Cassagnes (FRA)
Heimildarfólk:
FSF-umboð:

| Team A | Víkingur | | | ID | Team B | Linfield FC | | | ID |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25 | Hans Jákup Arngrímsson | M | | 29.03.2004 | 1 | Chris Johns | M | | |
| 4 | Atli Gregersen | L | | 15.06.1982 | 2 | Sam Roscoe | | | |
| 5 | Ragnar Skála | | | 05.09.2000 | 5 | Chris Shields | | | |
| 6 | Aron Jarnskor Ellingsgaard | | | 16.09.2002 | 7 | Kirk Millar | | | |
| 7 | Jákup Johansen | | | 27.04.1993 | 9 | Kieran Offord | | | |
| 10 | Sølvi Vatnhamar | | | 05.05.1986 | 15 | Ben Hall | | | |
| 14 | Ingi Jonhardsson | | | 11.09.2001 | 21 | Josh Archer | | | |
| 18 | Arnbjørn Svensson | | | 01.07.1999 | 22 | Jamie Mulgrew | L | | |
| 22 | Ari Olsen | | | 09.09.1998 | 27 | Ethan McGee | | | |
| 23 | Poul Kallsberg | | | 04.02.2003 | 29 | Matthew Fitzpatrick | | | |
| 30 | Árni Nóa Atlason | | | 15.01.2006 | 67 | Matthew Orr | | | |
| | | | | | | | | | |
| 1 | Bárður á Reynatrøð | M | | 08.01.2000 | 51 | David Walsh | M | | |
| 9 | Jørgen Nielsen | | (7) 69 | 30.11.2003 | 4 | Scot Whiteside | | | |
| 15 | Arnór Brandsson | | | 03.01.2007 | 8 | Kyle McClean | | (22) 46 | |
| 16 | Páll Eirik Djurhuus | | | 16.11.2003 | 10 | Charlie Allen | | (27) 58 | |
| 17 | Stefan Radosavljevic | | (5) 69 | 08.09.2000 | 17 | Christopher McKee | | (21) 70 | |
| 19 | Jákup Martin Jarnskor | | | 24.10.2005 | 24 | Sean Brown | | | |
| 20 | Bjørn Bakk Bjarkhamar | | | 19.04.2006 | 36 | Rhys Annett | | | |
| 24 | Jósef Ólavsson Gleðisheygg | | | 15.11.2007 | 37 | Ryan McKay | | | |
| 28 | Rani Hansen | | | 27.11.2000 | | | | | |
| 29 | Ingi Arngrímsson | | | 17.02.2006 | | | | | |
| 99 | Martin Klein Joensen | | | 26.12.1999 | | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| Jóhan Petur Poulsen (UEFA A) | Høvuðsvenjari | David Healy (Northern Ireland) |
| | Hjálparvenjari | |
| | Málmansvenjari | |
| | Fysiskur venjari | |
| | Fysioterapeut | |
| | Lækni | |
| | Security person | |
| | Kitman | |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Endastøða | 1:0 | 1:1 | 2:1 | | | |
| Scorer/Min | 15 3 | 29 9 | 14 56 | | | |
| BS/SM | SM | | | | | |

**Cautions:** Víkingur: 7 Jákup Johansen (59); 6 Aron Jarnskor Ellingsgaard (82); 17 Stefan Radosavljevic (86); Linfield FC: 9 Kieran Offord (47)

**BS:** Brotsspark **SM:** Sjálvmál **M:** Málmaður **L:** Liðskipari SPÆLT

## Dómaraseðil

# 2026 UEFA Europa Conference League - Third qualifying

## FC Neman Grodno - KÍ

## 2:0 AET (PEN 5:4) (0:0, 2:0, 2:0)

Dagur/tíð: 14.08.2025 19:00 WET | Umfar: 1/2F | Aldursbólkur: Vaksin
Leikvøllur: Szeged Grosics Akadémia / Szeged / Hungary | Áskoðarar: 1

Dómari: Donald Robertson (SCO)
1. hjalpardómari: Jonathan Bell (SCO)
2. hjálpardómari: Ross Macleod (SCO)
4. dómari: Duncan Nicolson (SCO)
Dómaraeygleiðari:

label.refereeAssistantExtra.short:
Delegate: Alpaslan Kavas (TUR)
Heimildarfólk:
FSF-umboð:

| Team A | FC Neman Grodno | | | ID |
|---|---|---|---|---|
| 12 | Maksim Belov | M | | |
| 5 | Yegor Parkhomenko | | | |
| 8 | Yuri Pantya | | | |
| 9 | Sergei Pushnyakov | | | |
| 15 | Oleg Evdokimov | | | |
| 19 | Konstantin Kuchinski | | | |
| 20 | Ivan Sadovnichi | L | | |
| 24 | Andrei Yakimov | | | |
| 47 | Mikhail Kozlov | | | |
| 71 | Anton Suchkov | | | |
| 88 | Pavel Savitski | | | |
| 1 | Artur Malievski | M | | |
| 6 | Artur Nazarenko | | | |
| 7 | Yuri Klochkov | | (71) 67 | |
| 11 | Yuri Gavrilov | | | |
| 17 | Yegor Zubovich | | (9) 46 | |
| 18 | Maksim Kravtsov | | (19) 72 | |
| 27 | Amantur Shamurzaev | | | |
| 30 | Valon Ahmedi | | (20) 115 | |
| 32 | Yuri Pavlyukovets | | | |
| 46 | Aleksei Legchilin | | | |
| 50 | Aleksei Shalashnikov | | | |
| 99 | Gulzhigit Borubaev | | (24) 72 | |

| Team B | KÍ | | | ID |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Sebastian Linnet John | M | | 26.03.1996 |
| 2 | Gaston Nicolas Tellechea | | | 16.12.1999 |
| 5 | Deni Pavlovic | | | 01.09.1993 |
| 7 | Árni Frederiksberg | | | 13.06.1992 |
| 8 | Jákup Biskopstø Andreasen | L | | 31.05.1998 |
| 9 | Páll Andrasson Klettskarð | | | 17.05.1990 |
| 10 | Hallur Hansson | | | 08.07.1992 |
| 13 | Patrik Johannesen | | | 07.09.1995 |
| 14 | René Shaki Joensen | | | 08.02.1993 |
| 22 | Odmar Færø | | | 01.11.1989 |
| 23 | Jóannes Kalsø Danielsen | | | 10.09.1997 |
| 96 | Mark Fabricius Jensen | M | | 22.11.1996 |
| 3 | Robert Behson-Courage Williams | | | 15.01.2000 |
| 6 | Mads B. Mikkelsen | | (9) 81 | 01.01.1960 |
| 11 | Jonn Johannessen | | | 30.12.2001 |
| 15 | Daniel Johansen | | (10) 61 | 09.07.1998 |
| 17 | Filip Brattbakk | | | 24.04.2000 |
| 19 | Dávid Biskopstø Andreasen | | (14) 81 | 27.06.2004 |
| 21 | Páll Müller | | | 09.02.2008 |
| 24 | Martin Rodrigo Gonzalez | | (5) 106 | 09.05.2003 |
| 26 | Gilli Rólantsson Sørensen | | (22) 11 | 11.08.1992 |
| 27 | Issah Ahmed Latif | | | 29.08.2002 |
| 32 | Claes Philip Kronberg | | (23) 106 | 19.04.1987 |

| FC Neman Grodno | | KÍ |
|---|---|---|
| Igor Kovalevich (Belarus) | Høvuðsvenjari | Magnus Powell (UEFA PRO (U)) |
| | Hjálparvenjari | |
| | Málmansvenjari | |
| | Fysiskur venjari | |
| | Fysioterapeut | |
| | Lækni | |
| | Security person | |
| | Kitman | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Endastøða | 1:0 | | 2:0 | |
| Scorer/Min | 99 | 80 | 8 | 84 |
| BS/SM | | | | |

✓ 5 Yegor Parkhomenko
✓ 7 Yuri Klochkov
✓ 17 Yegor Zubovich
✓ 18 Maksim Kravtsov
✓ 30 Valon Ahmedi

✓ 7 Árni Frederiksberg
✓ 8 Jákup Biskopstø Andreasen
× 13 Patrik Johannesen
✓ 15 Daniel Johansen
✓ 26 Gilli Rólantsson Sørensen

**Cautions:** FC Neman Grodno: 47 Mikhail Kozlov (77); 20 Ivan Sadovnichi (94); 15 Oleg Evdokimov (97); KÍ: 26 Gilli Rólantsson Sørensen (88); 6 Mads B. Mikkelsen (107); 10 Hallur Hansson (114); 13 Patrik Johannesen (120)

**Expulsions:** KÍ: 6 Mads B. Mikkelsen (112)

**BS:** Brotsspark **SM:** Sjálvmál **M:** Málmaður **L:** Liðskipari SPÆLT

**Dómaraseðil**

## 2026 UEFA Europa Conference League - Third qualifying

## Linfield FC - Víkingur
## 2:0 (2:0)

Dagur/tíð: 14.08.2025 19:45 WET | Umfar: 1/2F | Aldursbólkur: Vaksin
Leikvøllur: Windsor Park / Belfast / Northern Ireland | Áskoðarar: 3434

Dómari: Marek Radina (CZE)
1. hjalpardómari: Kamil Hajek (CZE)
2. hjálpardómari: Jaroslav Kubr (CZE)
4. dómari: Jan Všetečka (CZE)
Dómaraeygleiðari:

label.refereeAssistantExtra.short:
Delegate: Luka Steiner (SVN)
Heimildarfólk:
FSF-umboð:

| Team A | Linfield FC | | ID | Team B | Víkingur | | ID |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Chris Johns | M | | 1 | Bárður á Reynatrøð | M | 08.01.2000 |
| 2 | Sam Roscoe | | | 4 | Atli Gregersen | L | 15.06.1982 |
| 5 | Chris Shields | L | | 6 | Aron Jarnskor Ellingsgaard | | 16.09.2002 |
| 7 | Kirk Millar | | | 7 | Jákup Johansen | | 27.04.1993 |
| 8 | Kyle McClean | | | 10 | Sølvi Vatnhamar | | 05.05.1986 |
| 9 | Kieran Offord | | | 14 | Ingi Jonhardsson | | 11.09.2001 |
| 10 | Charlie Allen | | | 18 | Arnbjørn Svensson | | 01.07.1999 |
| 15 | Ben Hall | | | 22 | Ari Olsen | | 09.09.1998 |
| 21 | Josh Archer | | | 23 | Poul Kallsberg | | 04.02.2003 |
| 29 | Matthew Fitzpatrick | | | 29 | Ingi Arngrímsson | | 17.02.2006 |
| 67 | Matthew Orr | | | 30 | Árni Nóa Atlason | | 15.01.2006 |
| | | | | | | | |
| 51 | David Walsh | M (1) 67 | | 25 | Hans Jákup Arngrímsson | M | 29.03.2004 |
| 68 | Daragh Rooney | M | | 5 | Ragnar Skála | | 05.09.2000 |
| 4 | Scot Whiteside | | | 9 | Jørgen Nielsen | (7) 73 | 30.11.2003 |
| 17 | Christopher McKee | (9) 86 | | 15 | Arnór Brandsson | (30) 88 | 03.01.2007 |
| 24 | Sean Brown | (10) 82 | | 16 | Páll Eirik Djurhuus | | 16.11.2003 |
| 27 | Ethan McGee | (67) 67 | | 17 | Stefan Radosavljevic | (6) 73 | 08.09.2000 |
| 36 | Rhys Annett | | | 19 | Jákup Martin Jarnskor | | 24.10.2005 |
| 37 | Ryan McKay | | | 20 | Bjørn Bakk Bjarkhamar | | 19.04.2006 |
| 38 | Callumn Morrison | | | 24 | Jósef Ólavsson Gleðisheygg | | 15.11.2007 |
| | | | | 28 | Rani Hansen | (29) 88 | 27.11.2000 |
| | | | | 99 | Martin Klein Joensen | | 26.12.1999 |

David Healy (Northern Ireland) | Høvuðsvenjari | Jóhan Petur Poulsen (UEFA A)

Hjálparvenjari
Málmansvenjari
Fysiskur venjari
Fysioterapeut
Lækni
Security person
Kitman

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Endastøða | 1:0 | | 2:0 | |
| Scorer/Min | 9 | 22 | 22 | 38 |
| BS/SM | | | SM | |

**Cautions:** Víkingur: 22 Ari Olsen (13); 4 Atli Gregersen (27); 6 Aron Jarnskor Ellingsgaard (45+4); 29 Ingi Arngrímsson (63); 18 Arnbjørn Svensson (90+6)

**BS:** Brotsspark **SM:** Sjálvmál **M:** Málmaður **L:** Liðskipari SPÆLT

# Venjaraútbúgvingin

Tal av luttakarum á venjaraskeiðum í 2025:

| C1 | C2 | B3 | B4 /B-prógv | A-prógv |
|---|---|---|---|---|
| 67 | 16 | 0 | 17 | 0 |

Útbúgvingarárið 2025 hilnaðist væl. C1 skeið vórðu hildin í feløgum kring landið, í Vági, í Runavík og á Eiði, umframt at eitt skeið var í FSF húsinum.  67 luttakarar tóku C1 skeiðið. Í FSF var C2 á skrá í februar, og tá luttóku 16 luttakarar. Fyri fyrstu ferð hevur roynd verið gjørd at hava eitt C2 skeið sum fjarlestur í Suðri. Skeiðið er umbiðið av FC Suðuroy. 15 luttakarar úr feløgunum í Suðuroy eru við.

Tann praktiski parturin av skeiðnum, tvs. venjingarnar á vøllinum verða gjøgnumførdur fyrst í mars mánaði 2026. Eins og í 2024 var tilmeldingin til B3 skeiðið í november ikki nóg høg og tískil bleiv skeiðið av ongum. B3 hevur í drúgt áramál ligið eftir kappingarárslok, men nú vita vit, um til ber at hava B3 í feb-mars 2026. B4 skeiðið var í tíðarskeiðnum frá februar til juni og fingu 17 menn UEFA B prógv í 2025.

Nýtt umfar av A-venjaraútbúgvingini byrjaði í august, og heldur útbúgvingin fram til á heysti 2026.

Ráðstevnuna um barna -og ungdómsfótbólt var 28. februar – 1. mars 2025. B36 húsið og Tórsvøllur vóru sum vant karmar um ráðstevnuna. Høvuðsnavnið hesuferð var Kevin McGreskin úr Skotlandi, sum hevði framløgur og venjingar, umframt at føroysk innsløg eisini vóru á skrá. 90 luttakarar vóru við hesuferð.

Tvey impulsskeið vóru í 2025. Í mai mánaði vitjaði fyrrverandi Liverpool málverjuvenjarin, John Achterberg í Føroyum í samband við ein fótbóltsskúla, sum Jákup í Stórustovu stóð sum fyriskipari av. Jákup setti seg í samband við FSF at spyrja um møguleikarnar at fyriskipa eitt impulsskeið samstundis. 33 luttakarar lýddu á John Achterberg.

Tað eydnaðist ikki at fáa nakran til ársliga impulsskeiðið Dýra Biðidag, men í 12.oktober var Smæran karmur um sera væleydnað skeið, ið bar heitið: Landsliðið, altjóða fótbóltur og taktikkur. Skeiðið var sera væl vitjað! 53 fólk luttóku!

Í 2025 gjøgnumførdu vit á fyrsta sinni eina heila samanhangandi UEFA GK B útbúgving. 12 luttakarar fingu GK-B prógv, og kunnu tískil nú kallað seg málverjuvenjarar við B-lisensi.

Nýggja átakið "leikaraleiðin", sum er ætlað fyrrverandi og núverðandi topp leikarum, sum byrjaði í november 2024, fekk sera góða móttøku. Heili 32 luttakarar komu á mál í januar 2025 og fóru fleiri av hesum víðari á B4.

Árliga instruktørskeiðið var 17. – 18. Januar, har 30 undirvísarar luttóku. Høvuðsevnini hesuferð vóru ítróttarsálarfrøði, har luttakarar arbeiddu við útvaldum evnum, við vegleiðing frá Eyðvør Klakstein. Harumframt høvdu vit vitjan av FIFA undirvísaranum,

brasiliumanninum Giovanni Fernandes. Gio undirvísti í ymsum evnum, við høvuðsdenti á leiklutin hjá vegleiðaranum á vøllinum.

**Fótbóltsdeildin**
Í bygnaðin í FSF fyrisitingini er fótbóltsdeildin sett saman av landsliðsvenjarum, umframt serfrøðingum innan ávís øki, t.d. fysiskum venjara, tilsamans 8 starvsfólk.

Í 2025 bleiv arbeitt við at seta menning av úrvalsleikarum á breddan, og byrjaði hetta av álvara við temafundi við feløgunum 8. februar á Hotel Hilton. Á skránni var framløga og kjak, har feløgini viðgjørdu eitt meira ella minni ítøkiligt uppskot frá fótbóltsdeildini um víðkan av FSF úrvalsvenjingunum. Ætlanin var, at økja um talið á U15 og U16 úrvalsvenjingum, ímeðan arbeiðast skal við at byrja eitt úrvalstilboð fyri yngri aldursbólk, t.d. U13. Endamálið er, at leikarar fáa fleiri venjingartímar í einum umhvørvi, har tey bestu venja saman við teimum bestu.

Størsta fótbóltstiltakið í 2025 var uttan iva EM endaspælið fyri WU17 gentulandsliðini, har 8 lond vitjaðu okkum í døgunum 4. – 17. mai. Dystirnir vóru spældir í Klaksvík og á Tórsvølli og endaði hetta við finaluni á Tórsvølli 17. mai har Holland vann EM kappingina. Føroyar komu í bólk saman við Hollandi, Norra og Eysturríki, og bleiv talan um trý tap í sera torførum dystum. Hóast ítróttarliga avbjóðingin var sera stór, so var talan um eina stóra uppliving fyri okkara leikarar, og sum heild varð hetta ein væl fyriskipað kapping, sum FSF fekk stórt rós fyri eftirfylgjandi frá vitjandi londum og UEFA.

Ein stór broyting í fótbóltsdeildini í 2025 var, at nú fyrrverandi tekniski stjórin, Pætur Smith Clementsen bleiv A-landsliðsvenjari hjá kvinnum fulla tíð og av somu orsøk fór úr starvinum sum tekniskur stjóri. Hetta var beint eftir summarfrítíðina og 1. oktober byrjaði Jonas Nielsen sum nýggjur tekniskur stjóri í FSF.

27. oktober vóru høvuðsungdómsvenjararnir úr feløgunum savnaðir á fundi, har teir fingu møguleikan at heilsa uppá nýggja tekniska stjóran, og ætlanin at økja um úrvalsvenjingarnar í vetur varð eisini kunngjørd. Í novembur og desembur vóru U15 úrvalsvenjingar tvær ferðir um vikuna, meðan U13 meirvenjingar byrja tíðliga í 2026.

Í sambandi við A-landsdystirnar hjá monnum í Kroatia í novembur, var fótbóltsdeildin við á námsferð frá 12. til 19. novembur. Á ferðini varð vitjað hjá kroatiska fótbóltssambandinum, og hjá feløgunum NK Istra 1961 og HNK Rijeka, ið eru verandi kroatiskir meistarar. Á skránni vóru áhugaverdar framløgur og kjak.

Talan var um eina góða og væleydnaða námsferð, sum gav nógvan íblástur til at arbeiða víðari við leikaramenningini heima í Føroyum.

**Jonas Nielsen og Pætur Smith Clementsen**

# Dómarar

Árið 2025 byrjaði, sum siðvenja er, við úrmælinga- og eygleiðaraskeiðinum. Við ársbyrjan vóru 42 úrmælingar skrásettir, harav 21 dómarar og 21 hjálpardómarar í úrmælingabólkinum. Av hesum luttóku 41 á skeiðinum, og tríggir vóru við fyri fyrstu ferð. Ein teirra er ein kvinna, sum síðani 2023 hevur dømt í Betrideildini hjá kvinnum.

Eygleiðararnir vóru 13 í talið.

Í tí stóra og heila varð leisturin á úrmælingaskeiðinum hildin óbroyttur í mun til undanfarnu ár. Skráin er skipað soleiðis, at luttakararnir fáa nýggjasta ástøðiliga tilfar frá The IFAB og UEFA, sum síðani verður sett í verk í føroysku kappingunum. Ein stórur partur av skeiðinum fevnir um viðgerð av videobrotum, bæði úr altjóða fótbólti og úr heimligu kappingini.

Harafturat verða dómararnir kannaðir kropsliga og skulu klára eina rennroynd fyri at fáa rættindi at døma í Betrideildini og 1. deild hjá monnum, umframt í dystum um Løgmanssteypið.

Gestalærari á skeiðinum í ár var Leslie Irvine úr Írlandi. Hann hevði tveir fyrilestrar – annan um leiðslu og hin um hondbóltsbrot/spælið við hondini. Hetta gav skeiðinum eitt serliga læruríkt innihald.

Sum vanligt vóru eisini skeið fyri nýggjar dómarar og ymisk viðlíkahaldsskeið á skránni í 2025.

**Tal av dómarum**
FSF hevur ábyrgdina av at áseta dómarar til allar landskappingar í Betri- og 1. deild hjá monnum, 2. deild og U21, umframt Betrideildina hjá kvinnum, dystir um Løgmanssteypið og steypakappingina hjá kvinnum. Í Betri- og 1. deild hjá monnum eru tilsamans 10 lið, í 2. deild og U21 eru 11 lið í hvørjari kapping, og í Betrideildini hjá kvinnum eru 8 lið. Hetta merkir, at hvørt vikuskifti skulu ásetast umleið 80 dómarar og hjálpardómarar til dystir kring landið.

Feløgini hava skyldu at útvega eitt ávíst tal av dómarum í mun til, hvussu nógv lið tey hava í deildunum, har FSF ásetur dómarar. Í 2025 skuldi tí verið minst 108 virknir dómarar, men veruleikin var, at bert 95 vóru tøkir, tá best stóð til. Hetta skapti javnan trupulleikar, tí eins og leikarar kunnu dómarar fáa skaða ella hava aðrar fráverur gjøgnum árið. Av teirri orsøk var neyðugt at avmarka, hvussu nógvir dystir kundu leikast sama dag.

Fleiri ferðir var vandi fyri, at dystir máttu útsetast ella avlýsast vegna dómaratrot. Tað eydnaðist tó at halda kappingarnar koyrandi, tí nógvir dómarar tóku á seg at døma tveir ella tríggjar dystir sama vikuskifti. Hetta er tó ein óhaldbar loysn, tí tað økir um vandan fyri ovbyrjan og skaðum hjá dómarunum. Tað er tí alneyðugt, at feløgini og FSF í felag arbeiða fyri at fáa fleiri dómarar til vega.

Í hesum sambandi eru fleiri átøk sett í verk. Eitt serligt skeið fyri kvinnur er á breddanum, fyri at fáa fleiri kvinnur at royna seg sum dómarar. Eisini verður arbeitt við at gera partar av dómaraskeiðinum við próvtøku, FSF Dómarin, tøkan á netinum, so undirvísingin verður

lættari og tí møguliga røkka luttakarum. Onnur átøk eru í fyrireikingarstigi og verða væntandi sett í verk í 2026.

Um talið av dómarum ikki veksur munandi komandi árini, er vandi fyri, at FSF ikki kann tryggja, at allir dystir verða avgreiddir sambært skipanini. Hetta merkir eisini, at møguleikin fyri at áseta dómarar til fleiri deildir enn í dag, er ógvuliga avmarkaður.

**Dómaraskeið**
Fyri at spjaða skeiðvirksemi javnari út yvir árið, hevur dómaranevndin samtykt, at FSF-dómaraskeiðið við próvtøku, so vítt gjørligt, verður lagt í fyrsta kvartali. Samstundis verða C- og B-skeiðini flutt til seinasta kvartal. Hetta gevur tveir týðandi fyrimunir:

Dómarar, sum taka prógv tíðliga á árinum, fáa møguleika at døma stutt eftir at prógvið er fingið.

C- og B-skeiðini, sum verða hildin seinnapart av árinum, kunnu nýtast sum grundarlag fyri eftirmeting av virkseminum.

Harafturat er hetta ein fyrimunur fyri tilrættarleggingina av undirvísingini. Um neyðugt kunnu undantøk gerast frá hesum leisti.

**Luttøka**
C-skeið: 9 luttakarar
B-skeið: 5 luttakarar
Kveikingarskeið: 30 luttakarar

Kveikingarskeiðið er ætlað dómarum, ið hava tikið C- og B-skeið, men ikki eru úrmælingar. Luttakaratalið, sum hesaferð var serliga høgt og helst met, kann hava samband við, at skeiðið varð hildið fyrsta dagin á úrmælingaskeiðinum.

Samlingar, RefPal og eftirmeting
Umframt eftirmetingarfundin 15. november, vóru í ár tríggjar samlingar fyri úrmælingar og ein fyri eygleiðarar.

RefPal er ein talgildur portalur, sum ger tað møguligt hjá úrmælingum og eygleiðarum at viðgera og eftirmeta ymiskar støður úr undanfarnum dystum – serliga úr Betrideildini hjá monnum og til ein part úr dystum um Løgmanssteypið.

Endamálið við RefPal er, at dystarleiðarar og eygleiðarar bæði kunnu eftirmeta egnar dystir og samanbera niðurstøður við onnur. Soleiðis lærir man av hvørjum øðrum, og tí verður mett, at tað ikki er neyðugt við fleiri samlingum árliga.

**Fyrimunir við RefPal**
- Stórt savn av klippum við niðurstøðum er tøkt, sum ger at munandi tíð verður spard, tá skeið og undirvísing skulu fyriskipast.

- Skipanin gevur eisini yvirlit yvir miðaltøl, sum vísa gongdina hjá dystarleiðarunum, alt eftir hvussu dystirnir eru leiktir og eftirmettir.

- Harumframt ber til at samanbera klipp og niðurstøður við tilfar úr øðrum londum, sum eisini brúka RefPal, og hetta gevur eitt breiðari læringsgrundarlag.

**Dómaradeildin**
Á dómaradeildini eru tvey fulltíðarstørv. Umframt dómaraleiðaran eru eisini tvey hálvtíðarstørv, sum verða røkt av Peturi Reinert og Eileri Rasmussen.

Høvuðsuppgávurnar hjá teimum fevna m.a. um:
- At áseta dómarar og eygleiðarar til dystir.
- At menna og stuðla dómarum í teirra arbeiði.
- At samskipa skeið og undirvísing fyri nýggjar dómarar og teir, sum eru í dómarabólki 2.
- At vitja feløgini og veita teimum ráð og hjálp í tilgongdini at útvega og menna dómarar.
Tillagingar verða gjørdar eftir tørvi.

**VAR**
VAR er í dag ein natúrligur partur av altjóða fótbólti og døming. Flestu UEFA-limalond hava longu tikið skipanina í nýtslu í sínum heimligu kappingum, og í altjóða høpi verður VAR nýtt í alt fleiri kappingum. Hetta ger, at føroyskir dómarar mugu hava neyðuga útbúgving og royndir fyri at kunna fylgja við menningini og luttaka á altjóða stigi.

FSF hevur tí tikið støðu til at seta VAR í verk í Føroyum. Arbeiðið er komið væl áleiðis. VAR-bilurin er nú tøkur, og sjálv útgerðin er komin til landið. Arbeitt verður í løtuni við kameraskipanini og tøkni í tí sambandi.

Tveir føroyskir dómarar hava staðið royndina sum VAR-dómarar. Harumframt er ein VAR-dómari og fýra H-VAR-dómarar undir útbúgving hjá DBU, og sambært ætlan verða teir lidnir í mars 2026. Ætlanin er eisini at útbúgva fleiri dómarar afturat komandi árini, annaðhvørt í Føroyum ella í samstarvi við DBU.

Áðrenn VAR kann takast í nýtslu, skal skipanin góðkennast av FIFA. Umboð fyri FIFA vitjaðu í Føroyum í juni 2025 til ein IAAP-fund, sum er fyrsta stigið í góðkenningararbeiðinum. Endalig góðkenning skal liggja fyri, áðrenn VAR kann setast í verk.

Upprunaliga var ætlanin at taka VAR í nýtslu í 2025, men vegna ymiskar avbjóðingar er tíðarætlanin tillagað. Nú verður roknað við, at fyrstu dystir í føroyskum fótbólti við VAR verða leiktir í 2026.

**UEFA Core – menning av evnaríkum dómarum**
UEFA Core er eitt menningarátak ætlað evnaríkum dómarum og hjálpardómarum, sum hava eina vangamynd, ið hóskar væl til framtíðar dystarleiðarar á altjóða stigi. Luttakararnir fáa persónligar vegleiðarar og mentorar gjøgnum alt skeiðið, sum vanliga varðar eitt ár. Skeiðið fevnir um tvey intensiv tíðarskeið á umleið eina viku hjá UEFA, meðan restin av menningararbeiðinum fer fram í Føroyum.

Í skeiðstíðarskeiðinum skulu luttakararnir javnan senda videoupptøkur av sínum dystum til vegleiðararnar, sum geva ítøkiliga afturmelding og ráðgeving. Sum liður í menningini vitjaðu vegleiðararnir eisini í Føroyum og eygleiddu luttakararnar í tveimum dystum.

FSF luttekur javnan í UEFA Core og sendir vanliga luttakarar annaðhvørt ella triðjahvørt ár. Undanfarin ár sendu limalondini ein dómara og tveir hjálpardómarar, men skipanin er nú broytt soleiðis, at eitt land sendir ein dómara og ein hjálpardómara.

Í 2025 luttóku Jákup Øssurson Mohr og Jógvan Klakstein á UEFA Core. Luttøkan gevur teimum bæði fakliga styrki og týdningarmikið altjóða innlit, sum er ein týðandi liður í føroysku dómaramenningini og í arbeiðinum at fylgja við teimum krøvum, sum altjóða fótbóltur setir.

**Venjing**
Í fleiri ár hevur ein kropsligur venjari veitt úrmælingadómarunum venjingar og ferðast kring landið eina ferð um vikuna fyri at skipa felags uttanduravenjingar. Henda skipan gav tó ikki tað úrslitið, sum vónað varð.

Tí er venjingarskipanin nú løgd øðrvísi til rættis. Dómararnir fáa framhaldandi venjingar sendar, men hava nú ábyrgd av sjálvir at skráseta eitt kravt tal av venjingum og/ella dystum í Polar-skipanini hvørja viku. Hetta gevur teimum størri frælsi at leggja venjingina til rættis eftir egnum gerandisdegi, samstundis sum venjarin kann fylgja við gjøgnum alnótina.

Hóast dentur nú verður lagdur á einstaklingavenjing, er ætlanin kortini at savna dómararnar til felagsvenjing eina ferð um mánaðin. Hetta skal bæði styrkja felagsskapin og geva møguleika at arbeiða við felags fokusøkjum.

**Norðurlandasamstarv**
Norðurlondini hava í nógv ár havt eitt sera gott og skipað samstarv á dómarøkinum, hóast nakrar tillagingar eru gjørdar seinastu árini. Norðurlandadómarafundurin verður nú hildin annaðhvørt ár. Harafturat er ein árligur planleggingarfundur í Keypmannahavn viðvíkjandi umbýti, NM, fótbóltslógini og øðrum viðurskiftum viðvíkjandi døming.

Sambandið millum londini hevur vanliga verið sera gott, men nakrar avbjóðingar hava verið í samstarvinum um NM. Hetta hevur havt við sær, at føroyskir dómarar ikki hava luttikið í NM fyri dreingir seinastu árini. Tó var ein føroyskur eygleiðari við í NM í 2025, og tað tryggjar, at vit framvegis hava samband og innlit í arbeiðið.

Vónin er, at Føroyar aftur verða partur av NM komandi árini, tí kappingin er bæði mennandi og gevandi fyri teir dómarar, sum luttaka.

Hóast trupulleikar hava verið við NM, heldur samstarvið um umbýtisdystir fram sum vanligt. Vanliga senda vit ein dómara og ein hjálpardómara til fýra dystir í hinum norðurlondunum, og vit fáa tilsvarandi gestadómarar higar. Soleiðis var eisini í 2025, tó varð ein av dystunum avlýstur vegna ólag í flogferðsluni. Tað bar ikki til at finna ein nýggjan dyst, tí liðið var komið so langt út í kappingini.

**Yvirlit yvir umbýtisdystir í 2025**

| Land | Dystur | Dómari | HD 1 | HD 2 | 4. dómari |
|---|---|---|---|---|---|
| Danmark | Hillerød - Esbjerg | Kári á Høvdanum | | Djóni Jacobsen | |
| Finnland | SalPa – PK-35 | Áki L. Hansen | | Jógvan Klakstein | |
| Norra | Stabæk-Raufoss | Jákup Ø. Mohr | | Jógvan Klakstein | |
| Svøríki | Helsingborg - Udsikten | Alex Troleis | | Dominick Troleis | |
| KFD | Rødovre – FB (Keypmannahavn) | Annfinn Hjaltalin | Símeon Sigurstein | Danjal Fredriksberg | |

**Altjóða døming**

Føroyar hava í løtuni tveir dómarar og fýra hjálpardómarar á FIFA-listanum. Dómararnir eru Jóhan Hendrik Ellefsen og Heini Ziska Viðoy, meðan hjálpardómararnir eru Dan Højgaard, Jan Hermansen, Jørleif Djurhuus og Jógvan Breckmann.

Altjóða ásetingarnar í 2025 vóru munandi færri enn undanfarnu árini. Í alt dømdu føroysku toymini fimm dystir, samanborið við trettan árið fyri. Møguleiki var fyri trimum dystum afturat, men ein dómari mátti takka nei til eina minikapping av persónligum orsøkum.

Orsøkirnar til minkandi ásetingar eru ikki heilt greiðar. Eftirmetingarnar av avrikunum vóru sum heild góðar, hóast onkur smálutur kundi verið betri. Ein møgulig orsøk er tó, at føroysku altjóða dómararnir enn ikki hava royndir við VAR. Tá fleiri og fleiri altjóða kappingar brúka VAR, kann hetta hava ávirkað, hvørjar dystir teir verða valdir til.

Um VAR ikki verður sett í verk í Føroyum, er vandi fyri, at føroyskir altjóða dómarar fara at fáa færri ásetingar komandi árini. Tað undirstrikar týdningin av, at vit fylgja við menningini og tryggja, at okkara dómarar hava somu fortreytir sum teirra starvsfelagar í øðrum londum – og taka VAR í brúk í 2026.

| Kapping | Dystur | Dómari | HD 1 | HD 2 | 4. dómari |
|---|---|---|---|---|---|
| U21 | Írland - Andorra | Heini Z. Viðoy | Jørleif Djurhuus | Jógvan Breckmann | Jákup Ø. Mohr |
| UECL | Larna - Auda | Heini Z. Viðoy | Dan Højgaard | Jørleif Djurhuus | Alex Troleis |
| | | | | | |
| UYL | Racing FC Un. Lux. - Larna | Jóhan H. Ellefsen | Jørleif Djurhuus | Djóni Jacobsen | Cédric Biever |
| U21 | Skotland - Gibraltar | Jóhan H. Ellefsen | Dan Højgaard | Jørleif Djurhuus | Alex Troleis |
| UECL | Levadia – Iberia 1999 Tiblisi | Heini Z. Viðoy | Dan Højgaard | Jógvan Breckman | Heini Z. Viðoy |

**Altjóða eygleiðing**
Fyri fyrstu ferð sá út til, at Føroyar fóru at hava tríggjar altjóða eygleiðarar í 2025. Orsøkin var, at royndasti eygleiðarin, Niklas á Líðarenda, eftir ætlan skuldi lata næsta ættarlið taka við, tí hann skuldi gevast tá árið var av, vegna aldur.

Fyri at tryggja, at Føroyar ikki mistu eitt pláss á listanum, valdi FSF tí eisini at innstilla Petur Reinert sum altjóða eygleiðara. Altjóða eygleiðarar verða vanliga áramálsettir, og tí var umráðandi at tryggja, at triði eygleiðarin kom upp á listan, áðrenn Niklas á Líðarenda fór frá.

Tíverri gjørdist gongdin ein onnur enn væntað. Eftir stutta sjúkulegu andaðist Niklas á Líðarenda 5. mai, og hann náddi tí ikki at eygleiða nakran altjóða dyst í 2025. Hetta var ein stórur missur – bæði menniskjaliga og fakliga.

Lassin Isaksen og Petur Reinert eygleiddu tilsamans 15 dystir. Lassin níggju dystir, meðan Petur eygleiddi seks. Harumframt luttók Petur sum eygleiðari í NM fyri dreingir.

Eygleiðingarnar hjá teimum báðum fevndu um hesar kappingar:

Lassin Isaksen
- 1 FIFA HM-dyst
- 5 Europa League-dystir
- 2 Europa Conference League-dystir
- 1 UEFA Youth League-dyst

Petur Reinert
- 1 Europa Conference League-dyst
- 2 U21-landsdystir
- 3 dystir í U19-minikapping

**Minni um Niklas á Líðarenda**
Niklas á Líðarenda setti ein stóran varða eftir seg í føroyska dómarayrkinum. Hann var eitt serstakt menniskja – hjálpsamur, álítandi og við einum léttum lyndi, sum altíð skapti gott huglag.

Hansara skemtiliga og menniskjaligi verumáti, saman við hansara drúgvu royndum sum dómari, eygleiðari og instruktørur, hevur í meira enn 40 ár verið ein týðandi partur av arbeiðinum hjá okkum, sum hava havt gleðina av at samstarva við hann um døming og í FSF sum heild.

Hóast Niklas hevði stóran týdning fyri føroyska dómarayrkið og fótbóltin, var hann eyðmjúkur av lyndi og hevði lítlan tørv á uppmerksemi. Júst tí kendist tað serliga væl, tá hann varð heiðraður við Heiðursskjali Poul E. Petersen – ein viðurkenning, sum hóskar sera væl til hansara trúfesti og drívmegi.

Missurin er stórur. Vit hava tapt ein starvsfelaga, ein lærumeistara og ein vin. Men vit hava eisini varðveitt óteljandi góð minni, sum vit kunnu bera víðari. Tað er okkara felags ábyrgd at

lata minnið um Niklas liva – í arbeiðinum, í felagsskapinum og í teimum virðum, hann bar við sær.

Hvíl í friði, góði Niklas.

**Mál og mið**
Dómaradeildin setir á hvørjum ári mál og mið, sum skulu fremjast yvir eitt áramál. Nøkur av hesum eru stutt- ella miðal-, meðan onnur eru meira langsiktað. Í 2025 varð "Mál og mið 2026" samtykt.

Eitt afturvendandi mál er at fáa fleiri dómarar, eisini fleiri kvinnur, at gerast partur av dómaraskipanini. Hetta verður tó bert rokkið, um FSF og feløgini arbeiða tætt saman. Feløgini skulu hava eitt ávíst tal av dómarum, sum samsvarar við teirra tilmeldaðu lið, har FSF ásetur dómarar. Hetta er ein fortreyt fyri, at vit kunnu náa málinum.

At fáa nýggjar dómarar er eitt stig á vegnum; at fáa teir at døma og halda fram er eitt annað. Tað krevur, at øll feløgini kring landið taka ábyrgd saman við FSF og arbeiða fyri at økja talið av dómarum og tryggja, at teir trívast og verða verandi í skipanini. Tiltøk mugu setast í verk, so einki felag liggur undir minsta markinum.

Eitt møguligt stig er, at partar av dómaraundirvísingini verða lagdir út á netið, og at feløgini fáa betri stuðul til at byggja upp eitt dómaraumhvørvi. Hetta kann gera tað lættari bæði at tryggja tilgongd og at halda fast um nýggjar dómarar.

Sum fyrr nevnt hevur FSF í fleiri ár arbeitt miðvíst fyri at økja talið av kvinnuligum dómarum. Sum liður í hesum verður eitt serligt dómaraskeið, ætlað kvinnum, fyriskipað fyrst í 2026.

Onnur tiltøk vera eisini sett í verk í komandi tíðum.

**Samanumtøka**
Sum heild gekk tað væl at avgreiða kappingarnar í 2025, millum annað tí at fleiri dystarleiðarar dømdu fleiri dystir sama vikuskiftið. Hetta gjørdi, at vit megnaðu at halda kappingarnar á einum støðugum og góðum stigi gjøgnum alt árið.

Dómarar, eygleiðarar og øll onnur, sum arbeiða til frama fyri dømingina, eiga eina stóra tøkk fyri teirra íkast.

Uttan teirra arbeiði og trúfesti hevði kappingarárið ikki eydnast á sama hátt.

15. november 2025.

**Lassin Isaksen**
Dómaraleiðari

# Grassroots (grasrøturnar)

**Tiltøk í samband við landsdystir hjá kvinnum og monnum**
Eins og undanfarin ár, varð aftur í 2025 skipað fyri U9 venjing saman við leikarum og venjarum á kvinnulandsliðnum. Hetta var í sambandi við ein heimadyst í juni. Hesaferð var venjingin í Sarpugerði í Norðragøtu har 160 børn luttóku.

Og til heimadystin hjá A-landsliðnum hjá monnum fyrst í september, var so avgjørt at royna sama leist, men hesaferð við U11 aldursbólkinum. Av royndunum - til undanfarnu venjingar við kvinnulandsliðnum - við at luttakaratalið skjótt kann gerast ógvuliga høgt, var avgjørt at seta eitt hámark á umleið 100 luttakarar, soleiðis at luttakararnir kundu býtast í 8 bólkar á umleið 12-14 í hvørjum. Hetta var gjørt fyri at tryggja, at tað bleiv ein góð venjing, og at økini til ymisku statiónirnar ikki gjørrdist ov lítil.

Undirtøkan var sera góð, og longu aftaná ein góðan tíma, var fult teknað.



**Fótbóltsskúlarnir**
Í 2025 varð avgjørt at broyta leistin fyri, hvussu fótbóltsskúlarnir verða fyriskipaðir. Av tí at FSF seinastu árini bert hevur staðið fyri tí fyrisitingarliga, men ikki fyri innihaldinum, var avgjørt, at fótbóltsskúlarnir ikki longur skulu eita FSF fótbóltsskúlin, men Fótbóltsskúlin í t.d. Klaksvík ella Havn.

Á henda hátt verður tað greiðari, at tað eru feløgini, ið skipa fyri, og sum eiga rós uppiborðið fyri eitt gott fótbóltsskúlatilboð. FSF ásetur nakrar karmar fyri, hvussu skúlin eigur at fyriskipast, og bíleggur bóltar og T-troyggjur, umframt at standa fyri tilmeldingini og luttøkubrøvum.

Í 2025 vóru fýra feløg, ið skipaðu fyri fótbóltsskúla í samstarv við FSF (KÍ, FC Suðuroy, 07 Vestur og NSÍ) Tal av luttakarum til ávísu fótbóltsskúlanar sæst í talvuni niðanfyri. Alt var væl fyriskipað og gekk væl.

Afturat vanligu fótbóltsskúlunum, sum feløgini skipa fyri, var skipað fyri einum FSF fótbóltsskúla á Tórsvølli fyri U9, U11 og U13, sum var nakað væl minni í vavi enn hinir fótbóltsskúlarnir. Tað var skipað soleiðis, at U9 vandu fyri seg í tveir tímar, síðani U11 í tveir tímar og til síðst U13, somuleiðis í tveir tímar – í tveir fylgjandi dagar.

Venjarar, ið eru knýttir at umgdómslandsliðunum og úrvalsvenjingini hjá FSF, stóðu fyri venjingunum. Pláss var fyri 96 leikarum í hvørjum av teimum trimum árgangunum. Tað var fullteknað í U9 og U11, meðan tað í U13 vóru 77 lutakarar tilmeldaðir. Eitt væleydnað tiltak.

Luttakararnir fingu hvør sína t-troyggju, men ikki bólt og døgurða, sum til fótbóltsskúlan hjá feløgunum.



Tað luttóku tilsamans 718 børn í teimum 5 fótbóltsskúlunum, samanborið við 447 børn í 2024.

| Fótbóltsskúlarnir | Dreingir | Gentur | Tilsamans | Dreingir | Gentur |
|---|---|---|---|---|---|
| FSF-fótbóltsskúlin | 204 | 65 | 269 | 76% | 24% |
| Klaksvík | 109 | 68 | 177 | 62% | 38% |
| Vágur | 34 | 19 | 53 | 64% | 36% |
| Sørvágur | 74 | 31 | 105 | 70% | 30% |
| Runavík | 87 | 27 | 114 | 76% | 24% |
| Tilsamans | 508 | 210 | 718 | 71% | 29% |

**Samstarv við Reyða Kross**
Í sambandi við at grunnurin UEFA foundation for children hevði 10 ár á baki í 2025 fekk FSF í boði at skipa fyri onkrum slagið av tiltakið fyri útsett børn. Hetta kundi gerast í samstarvi við ein annan føroyskan felagsskap. Av tí at eitt umboð frá FSF longu í 2024 var við á summarleguni fyri børn hjá Reyða Krossi, var hetta eitt upplagt val.

Summarlegan hjá Reyða Krossi, sum er fyri børn úr sosialt og fíggjarliga sárbærum familjum, var í 2025 hildin í Skálavík í døgunum 29. juni til 4. juli. Peningur úr grunninum hjá UEFA var við til at fíggja ein stóran part av leguni, umframt at øll børnini fingu ein venjingarbúna frá FSF: T-troyggju, troyggju og buksur. Afturat hesum skipaði FSF fyri eini venjing fyri børn og leiðarar á leguni á vøllinum inni í Dal á Sandi.

Í samráð við Reyða Kross var eisini ein lítil partur av peninginum frá UEFA grunninum nýttur til eitt jólatiltak fyri flóttafólk úr Ukraina, sum var í hølunum á Vestursíðuni á Tórsvølli í november. Umleið 30 flóttafólk luttóku.

**Grassrootsvikan**
Árliga grassrootsvikan var aftur á skránni í 2025. Tiltakið "Bóltur og Spæl", ið nú er blivið eitt afturvendandi tiltak, var eisini á skránni. Endamálið er at geva børnunum eina góða og stuttliga venjing, sum øll kunnu luttaka í. Tiltakið var hildið í Klaksvík, Runavík, Miðvági og í Havn, og var stak væl eyðnað.

Av tí at ferðasambandið til Suðuroyar var so svikaligt, meðan ferjan Galaxy var sett inn fyri Smyril, var onki tiltak í Suðuroynni í 2025. Innbjóðing var send øllum dagstovnum á meginøkinum, og varð tiltakið skipað sum statiónsvenjing við ymiskum rørsluspølum, bæði við og uttan bólt. Næmingar úr 9. og 10. flokkum úr skúlum í økinum vóru eisini við sum hjálparfólk. Teirra leiklutur var at greiða frá spølunum og seta í gongd, og síðani hjálptu starvsfólkini frá luttakandi stovnunum til.

Luttøkan var góð. 450 barnagarðsbørn luttóku saman við umleið 120 starvsfólkum, umframt at 130 skúlanæmingar tóku lut sum hjálparfólk.

Í samstarvi við Parasport var eisini skipað fyri einum fótbóltstiltakið fyri serbreytirnar á miðnámi. Tiltakið skuldi vera á Tórsvølli, men orsakað av grimdarregni henda dagin, var tiltakið flutt niðan í høllina á Hálsi. Umleið 50 næmingar og lærarar luttóku 😊

**Skúlaleikir**
Í 2025 legðist fótbóltur afturat Skúlaleikum, sum vera fyriskipaðar av ÍSF. Ein stórur stevnudagur fyri allar 7. flokkar í Føroyum var hildin í apríl, og umleið ein triðingur av næmingunum, umleið 200 í tali, luttóku á bóltbreytini, og skuldu tí leggja leiðina framvið Tórsvøll, har tey skuldu royna seg í nøkrum fótbóltsavbjóðingum, har endamálið var at savna flest stig til sítt lið. Eini 12 starvsfólk frá FSF stóðu klár at taka ímóti næmingunum og leiða tey ígjøgnum avbjoðingarnar.

Fótbóltur verður í skúlaárinum 2025/2026 ein av ítróttargreinunum fyri 6. flokkarnar. Í heyst fór so arbeiðið í gongd við at gera tilfar til tríggjar ítróttartímar til 6. flokk. Endamálið er at

vísa á, hvussu fótbóltur kann verða nýttur í ítróttartímunum. Fyri at kunna fevna um allar næmingar, royndar sum óroyndar í fótbólti, verður fótbóltsvenjingin tillagað.

Tilfarið liggur tókt á heimasíðuni skulaleikir.fo. 12 skúlar hava skrivað seg upp til at fáa vitjan til ein ítróttartíma við fótbólti sum evni, og fyrst í 2026 byrja skúlavitjanirnar, har umboð frá FSF fara út til ávísu skúlarnar, og skipa fyri einum ítróttartíma.

**Fótbóltstilboð fyri fólk við menningartarni**
Trý venjingartilboð vóru í 2025.

Venjingartilboðið hjá B36 fyri børn við menningartarni í aldurinum 8-12 ár, sum kallast Fótbóltur fyri øll, helt fram í 2025. Venjing var eina ferð um vikuni í tíðarskeiðnum apríl-oktober.

NSÍ hevur í ár eisini havt eitt tilboð fyri fólk við menningartarni, sum kallast "NSÍ Frælsið". Tilboðið hevur verið fyri børn og vaksin, og venjing hevur verið einaferð um vikuna í apríl-oktober.

Tilboðið til vaksnar leikarar við menningartarni við venjara úr HB helt fram í 2025, men óvist er, hvussu verður framyvir, tí trupult er at fáa venjarar at taka sær av regluligu venjingunum.

**Christina Ravnsfjall**
Grassrootssamskipari

# Disney Playmakers

Eftir eitt royndarumfar við tveimum støðum í 2024, varð Disney Playmakers átakið breitt út til fleiri feløg og gentur í 2025.

Disney Playmakers er rekrutteringsátak fyri 5-6 ára gamlar gentur, sum FSF bjóðar út í samstarvi við føroysku feløgini, UEFA og Disney. Eitt umfar fevnir um 8-10 venjingar, har søgugongdin úr einum Disneyfilmi er grundarlag undir venjingum og spølum, og lívsførleikar, kropsligir førleikar og grundleggjandi bóltførleikar eru í miðdeplinum. Sum heild er talan um eitt øðrvísi og nýhugsað fótbóltstilnoð, sum er sniðgivið til at geva gentum í yngru aldursbólkunum eina góða og stuttliga byrjan uppá fótbólt.



Várið 2025 varð átakið boðið út í átta ymiskum støðum kring landið, har søgugongdin úr Disneyfilminum Frozen2 varð gjøgnumspæld:

Á Argjum (í samstarvi við AB), í Trongisvági (í samstarvi við TB), í Havn (í samstarvi við B36), á Sandi (í samstarvi við B71), á Giljanesi (í samstarvi við MB og 07 Vestur), í Sundalagnum (í samstarvi við EB/Streym), Í Fuglafirði (í samstarvi við ÍF) og í Klaksvík (í samstarvi við KÍ).

Tilsamans 131 gentur luttóku í vár-umfarinum, og 73% av teimum tilmeldaðu høvdu ongar royndir við skipaðum fótbólti frammanundan. Hetta er serstakliga gleðiligt at vísa á við tað, at átakið serliga vendir sær til gentur, sum ongar royndir hava við fótbólti frammanundan og sum helst ikki høvdu komið til “vanliga” fótbóltsvenjing, men sum við Playmakers fáa eina byrjan, sum er sniðgivin eftir júst teirra tørvi.

Móttøkan hevur eisini verið serstakliga góð, og í eftirmetingini góvu foreldur átakinum 4,6 stjørnur av 5 møguligum. Tveir triðingar svaraðu í eftirmetingini, at gentan nú gekk til

skipaðan fótbólt í einum felag, og av teimum svaraði nærum helvtin, at Playmakers eftir teirra tykki hevði gjørt avgerandi mun fyri avgerðina um at royna skipaðan fótbólt.



Í september – november varð enn eitt umfar boðið út við Frozen2, tó við færri støðum og luttakarum. Tilsamans 63 gentur luttóku í fýra ymiskum støðum (Argir/AB, Havn/HB, Gøta/Víkingur og Klaksvík/KÍ) og skoðsmálini í eftirmetingini vóru aftur avbera góð. Foreldrini góvu nú átakinum 4,7 stjørnur av 5 møguligum, og nærum øll foreldrini mettu hesaferð, at gentan nú hevði hug til skipaðan fótbólt, og at Playmakers hevði gjørt avgerandi mun hesum viðvíkjandi.

Umframt at vera væleydnað tilboð til nýggjar gentur í fótbólti, so hevur Playmakers eisini víst seg sum ein góð byrjan fyri fleiri nýggjar venjarar. Allir venjararnir í átakinum eru kvinnur og fleiri hava ikki áður roynt seg sum fótbóltsvenjarar. Hetta er bæði gleðiligt fyri fjølbroytnið og støddina á føroyska venjarahópinum, umframt at hetta gevur feløgunum fleiri royndar venjarar við viðkomandi vitan at heita á til yngstu gentuliðini.

# Kæruúrskurðir 2025

## AGA- & ETISKANEVNDIN

**KÆRA 1/2025**

| *FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: Kæra frá FSF um hending í vinardysti millum FC Hoyvík og B71 (U17 Dreingir) leiktur 26. mars 2025 í Hoyvík** | |
| Deild: U17 Dreingir | Hvør hevur reist málið: Starvsnevnd FSF´s |
| Kapping: Vinardystur | Nevndin móttikið kæru: 4. apríl 2025 |
| Møguligt brot framt: 26. mars 2025 | Kærugjald goldið: Óviðkomandi |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: Óviðkomandi |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | Starvsnevndarummæli: Nei |

**Úrskurður**

Aga- og etiskanevndin hevur avgjørt, at revsa **FC Hoyvík** við eini bót á kr. 10.001 ásett við heimild í § 6, bókstav c í 1. reglubroti í Aga- og etiskureglugerðini.

Úrskurðurin kann kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar aftaná móttøku av úrskurðinum

**Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli**

Kæran er frá Starvsnevnd FSF´s, sambært grein 5, stk. 2 í Aga- og etiskureglugerðini, til Aga- og etiskunevndina í samband við hendingar, sum fóru fram í sambandi við vinardystin millum U17-liðini hjá FC Hoyvík og B71, spældur í Hoyvík tann 26. mars 2025.

Málið snýr seg um, at ein bólkur av leikarum og ungdómi, sum sambært dómarafrágreiðingini høvdu tilknýti til FC Hoyvík, løgdu eftir linjuverjanum, sum var ein 15 ára gamal drongur og leikari frá B71, umringaðu hann og skumpaðu hann. Eftir dystin váttaðu bæði leikarar úr B71 og FC Hoyvík, at eini drongurin hevði givið linjuverjanum nevan.

FC Hoyvík er biðið um viðmerkingar í málunum, og hevur sent svarskriv, har FC Hoyvík váttar at tað sum stendur í dómarafrágreiðingini er tað sum fór fram. FC Hoyvík hevur sum avleiðing av hesum tikið U17 liðið úr kappingini og boðað frá, at felagið fer undir eina innanhýsis tilgongd at tryggja ein framhaldandi virðiligan og góðan felagsskap.

**Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Vísandi til grein 2, 3 og 5 í Aga- og etiskureglugerðini hjá FSF, hevur Aga- og etiskanevndin málsføri at viðgera hetta mál.

Somuleiðis er viðkomandi at vísa til FIFA Disciplinary Code 2023 grein 30, stk. 2, nú talan er um vinardyst í ítøkiliga málinum. Har stendur fylgjandi:

*“Confederations, associations and other sports organisations are responsible for investigating, prosecuting and sanctioning conduct in their respective jurisdictions. In particular, confederations shall have jurisdiction on disciplinary matters related to friendly matches and competitions between representative teams or clubs belonging to the same confederation, provided that the competition is not organised by FIFA.”*

Síða **1** av **3**

## AGA- & ETISKANEVNDIN

**Fakta í málinum**

Sambært dómarafrágreiðing var harður tóni og stemningur kring vøllin allan dystin. Dysturin varð merktur av, at nógvir ungir menn standa framman fyri bonkin hjá FC Hoyvík, og dómarin verður noyddur at steðga dystinum og heita á hesar um at seta seg niður.

Beint áðrenn hálvleik fær FC Hoyvík bóltin í málið, og minst 15 persónar storma inn á vøllin, talan er bæði um leikarar og áskoðarar. Tá málið verður kolldømt rennur riðilin til linjuverjan og umringa og skumpa hendan. Linjuverjin var ein 15 ára gamal drongur og hevði júst tikið dómaraskeið tveir dagar frammanundan. Sambært dómarafrágreiðingini vátta bæði leikarar úr B71 og FC Hoyvík, at eini drongurin hevði givið linjuverjanum nevan. Dómarin fer yvir til rúgvuna og hjálpir linjuverjanum úr rúgvuni.

Dómarin velur at bríksla dystin av og heitur á liðini um at fara av vøllinum.

FC Hoyvík vísir á, at dómarafrágreiðingin er ein røtt endurgeving av tí, ið fór fram. FC Hoyvík hevur sum avleiðing av hesum tikið U17 liðið úr kappingini og boðað frá, at felagið fer undir eina innanhýsis tilgongd at tryggja ein framhaldandi virðiligan og góðan felagsskap.

Starvsnevnd FSF´s heitir eftir hetta, við støði í dómarafrágreiðing og hoyringsvari, á Aga- og etiskunevndina um at taka málið til viðgerðar sambært galdandi lógum og reglugerðum.

**Lógarverkið**

Kappingarreglugerðin hevur í grein 24 greiðar reglur um, at tað felag, sum hevur heimavøll, hevur ábyrgdina av vælferð dómaranna og hjálpardómaranna bæði undan, undir og eftir dystin. Felagið skal ansa eftir, at eingin áskoðari órógvar ella sýnir óhøviskan atburð móti dómara, hjálpardómara ella leikara. Tá ið dystur verður leiktur, má eingin koma inn á vøllin uttan við serligum loyvi frá dómaranum.

Hóast talan ikki er um dyst í beinleiðis kapping tá talan er um vinardyst, metur Aga- og etiskanevndin at somu reglur og prinsippir, sum í grein 24 í Kappingarreglugerðini, kunnu leggjast til grund í viðgerðini av kæruni. Vísast kann í hesum sambandi eisini til grein 17 í FIFA Disciplinary Code 2023.

Harumframt verður víst til FIFA Disciplinary Code 2023 grein 30, stk. 2 umframt grein 2, 3 og 5 í Aga- og etiskureglugerðini hjá FSF, viðvíkjandi málsførinum hjá Aga- og etiskanevndin at viðgera hetta mál.

Sambært § 6 í Aga- og etisku reglugerðini, kunnu feløg verða dømd agarevsing fyri brot á fótbóltsregluverkið.

Vísandi til § 37 í kappingarreglunum fyri fótbólt, hevur Kappingarnevndin gjørt “Vegleðing um leikbann”, har tað m.a. framgongur av grein 7, at feløgini hava fulla ábyrgd av fyriskipan og døming av venjingardystum. Brot, sum seta fótbóltin í ringt ljós, verða sekta við bót og møguligum leikbanni til leikarar og/ella burturvísing til leiðarar, venjarar o.o. Sambært grein 11 í somu vegleðing kann felag eisini fáa revsing um áskoðarar tess vísa óhøviskan atburð.

Síða **2** av **3**

## AGA- & ETISKANEVNDIN

**Staðfestingar, metingar og niðurstøða**

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at tað er prógfast, at harðskapur er framdur móti limi av dómaratoyminum til omanfyri umrødda dyst. Staðfest er at eini linjuverjin til dystin, ein 15 ára gamal drongur, í sambandi við at eitt mál hjá FC Hoyvík verður kolldømt vegna rangstøðu, verður umringaður, skumpaður og sligin av einum bólki av ungdómi og leikarum, sum sambært dómarafrágreiðingini høvdu tilknýti til FC Hoyvík.

Fordømi eru um í grannalondum okkara, at harðskapur móti dómaratoyminum hevur viðført útihýsing av liðum frá kappingum, drúgv leikbann til leikarar, bøtur vm. til feløg osv.

FC Hoyvík hevur longu undan hesi avgerð valt at taka U17 liðið hjá dreingjum úr kappingunum hjá FSF, sum beinleiðis avleiðing av omanfyrinevndu hending.

Út frá tilfarinum sum er lagt fyri Aga- og etiskunevndina ber ikki til at eyðmerkja einstakar leikarar ella persónar í sambandi við omanfyrinevndu hending.

Aga- og etiskanevndin hevur tí avgjørt, at revsa **FC Hoyvík** við eini bót á kr. 10.001 ásett við heimild í § 6, bókstav c í 1. reglubroti í Aga- og etiskureglugerðini.

Úrskurðurin kann kærast til Yvirkærunevndina.

**Kæruvegleiðing**

Sambært grein 10 í Aga- og etiskureglugerðini, kann úrskurðurin um bót á kr. 10.001 til FC Hoyvík kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar aftaná móttøku av úrskurðinum.

**Staður, dagfesting og undirskrift:**

**Tórshavn 14. apríl 2025**

Eli Thorsteinsson
Formaður

Í Aga- og etiskunevndini eru:

- Eli Thorsteinsson, formaður og løgfrøðingur
- Ken Nónklett, varaformaður og løgfrøðingur
- Anni á Hædd, løgfrøðingur
- Jóhan T. Davidsen, løgfrøðingur
- Birita S. Samuelsen, løgfrøðingur

Síða **3** av **3**

## AGA- & ETISKANEVNDIN

**KÆRA 2/2025**

| *FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: NSÍ kærir Skála ÍF fyri brúk av leikara, ið ikki var skrásettur á dómaraseðlinum, 1. deild menn** | |
| Deild: 1. deild, menn | Hvør hevur reist málið: NSÍ |
| Kapping: Landskapping | Nevndin móttikið kæru: 6. apríl 2025 |
| Møguligt brot framt: 29. mars 2025 | Kærugjald goldið: Ja |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: Ja. |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | Starvsnevndarummæli: Ongar viðmerkingar |

**Úrskurður**

Aga- og etiskanevndin hevur avgjørt at revsa **Skála ÍF** við bót á kr. 5.000 fyri umsitingarligt óskil og brot á grein 28 í Kappingarreglugerðini í sambandi við dyst móti NSÍ í 1. deild hjá monnum, leiktur tann 29. mars 2025, har Skála ÍF gjørdi brúk av leikara, ið ikki var skrásettur á dómaraseðlinum.

Aga- og etiskanevndin hevur somuleiðis avgjørt, at leikliga dystarúrslitið skal standa við.

Úrskurðurin kann ikki kærast til Yvirkærunevndina.

**Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli**

NSÍ kærir Skála ÍF í sambandi við dyst í 1. deild hjá monnum, leiktur tann 29. mars 2025, fyri brúk av leikara, sum ikki stóð skrásettur á dómaraseðlinum. Skála ÍF vann dystin 0-4.

Skála ÍF er hoyrt í málinum og hevur viðurkent, at felagið skrásetti skeivan leikara á dómaraseðilin og at talan var um eitt umsitingarligt mistak. Tvs. Skála ÍF hevur viðurkent brot á grein 28 í Kappingarreglugerðini av misgáum.

Skála ÍF vísir víðari á, at felagið ikki hevur fingið nakran av órøttum ítróttarligan fyrimun av brotinum á grein 28 í Kappingarreglugerðini, við tað at leikarin er lógligur leikari hjá Skála ÍF í 1. deild hjá monnum og var leikbærur til umrødda dyst, umframt at nevnda brot á grein 28 í Kappingarreglugerðini er hent vegna umsitingarligt mistak.

**Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Vísandi til grein 2, 3 og 5 í Aga- og etiskureglugerðini hjá FSF, hevur Aga- og etiskanevndin málsføri at viðgera hetta mál.

**Fakta í málinum**

Skrivstovan hjá FSF hevur upplýst málið og eftirkannað skrásetingarnar á dómaraseðlinum. Staðfestast kann, at Skála ÍF hevur gjørt brúk av einum leikara til umrødda dyst, sum ikki var skrásettur á dómaraseðlinum.

Síða **1** av **3**

## AGA- & ETISKANEVNDIN

Talan er um leikaran Boas Bárðarson Hammer, sum á degnum leikti við nr. 21 á rygginum, sum bleiv skiftur inn fyri leikara nr. 20, eftir at 76 minuttir vóru leiktir.

Á leikaralistanum hjá Skála ÍF er eingin leikari skrásettur við nr. 21, men ein nr. 23 Dávid Johansen, sum sambært Skála ÍF ikki skuldi verða á leikaralistanum. Sambært Skála ÍF var Dávid Johansen skaddur og ikki tilstaðar við Løkin til dystin.

Sambært skrásetingini í Comet-skipanini er feilskráseting farin fram við tað at leikari nr. 24 stendur at vera innskiftan fyri nr. 20. Leikari nr. 24 var á útskiftingarbonkinum allan dystin og kom ongantíð inn á vøllin. Skála ÍF hevði 7 eykaleikarar við til dystin.

FSF hevur eisini staðfest, at umrøddi leikarin Boas Bárðarson Hammer, f. 15.10.2007, hevur havt leikaraloyvi skrásett hjá Skála ÍF síðani 12.09.2019, og tí annars hevur aldur og lógliga kann spæla dystir fyri Skála ÍF í 1. deild hjá monnum.

Onki er upplýst um møguligar aðrar orsøkir, leikbann ella líknandi, til at leikarin ikki skuldi verið leikbærur til umrødda dyst.

**Lógarverkið**

Kappingarreglugerðin hevur í grein 28 greiðar reglur um, at allir leikarar til ein dyst skulu vera skrásettir á dómaraseðlinum.

Sambært § 6 í Aga- og etiskureglugerðini, kunnu feløg verða dømd agarevsing fyri brot á fótbóltsregluverkið.

**Staðfestingar, metingar og niðurstøða**

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at Skála ÍF hevur framt brot á grein 28 í Kappingarreglugerðini við at gera brúk av leikara í dysti millum NSÍ og Skála ÍF í 1. deild hjá monnum tann 29. mars 2025, sum ikki var skrásettur á dómaraseðlinum.

At gera brúk av leikara, ið ikki er skrásettur á dómaraseðlinum er brot á regluverk FSF's, hóast talan kann vera um umsitingarligt mistak. Tað er felagið sjálvt, í hesum føri Skála ÍF, sum hevur ábyrgd av egnum fyrisitingarligum viðurskiftum.

Fordømi er um, t.d. í Danmark, at nýtsla av leikara, sum ikki er skrásettur á dómaraseðlinum verður revsað við bót, tá metingin er at brotið er hent vegna umsitingarligt mistak ella av ósketni og brotið ikki hevur havt við sær ein av órøttum ítróttarligan fyrimun fyri felagið. Sí t.d. sak 079-23/24 frá danska Fodboldens Disciplinærinstans.

Fordømi er eisini um, t.d. frá Aðalskrivstovu FSF´s, at umsitingarligt óskil er revsa við bót á kr. 5.000. Sí t.d. kæru 8/2024.

Revsing við bót verður mett hóskandi og proportional í mun til ítøkiligu umstøðurnar í málinum og brotið á grein 28 í Kappingarreglugerðini. Hetta heldur enn eitt nú ógilding av dystarúrslitinum við tí avleiðing at felagið verður dømt at tapa dystin, sum oftast er avleiðingin tá

## AGA- & ETISKANEVNDIN

talan er um brot á grein 28 í Kappingarreglugerðini, sum er framt við vilja og/ella brot á grein 28 í Kappingarreglugerðini, sum hevur havt við sær ein av órøttum ítróttarligan fyrimun.

Ein av órøttum ítróttarligur fyrimunur kundi t.d. verið um leikarin, sum ikki stóð skrásettur á dómarseðlinum, men leikti kortini, t.d. ikki hevði leikaraloyvið uppá pláss, hevði leikbann, hevði leikt fleiri dystir enn loyvt sama dystarumfar, ikki hevði aldur at leika osv.

Aga- og etiskanevndin metir, at omanfyrinevnda brot á grein 28 í Kappingarreglugerðini er hent vegna umsitingarligt mistak hjá Skála ÍF, vísandi til hoyringssvar og frágreiðing frá Skála ÍF.

Harumframt er metingin hjá Aga- og etiskanevndini, at brotið ikki hevur viðført nakran av órøttum ítróttarligan fyrimun fyri Skála ÍF. Hetta m.a. tí at umrøddi leikarin, Boas Bárðarson Hammer, hevur leikaraloyvið í Skála ÍF, hevur aldur til at spæla í deildini og annars var leikbærur til nevnda dyst tann 29. mars 2025 millum NSÍ og Skála ÍF í 1. deild hjá monnum.

Umsitingarliga mistakið skal í ítøkiliga førinum ikki føra til at leikarin gerst ólógligur leikari til nevnda dyst, tí leikarin annars var leikbærur til dystin. Aganevndin metir tí ikki, at brotið skal føra til, at Skála ÍF skal dømast at tapa dystin, men at brotið skal revsast við bót í hesum ítøkiliga førinum.

Skála ÍF verður tí sambært § 6, bókstav c í 1. reglubroti í Aga- og etiskureglugerðini revsað við bót á kr. 5.000 fyri umsitingarligt óskil og brot á grein 28 í Kappingarreglugerðini. Aga- og etiskanevndin hevur somuleiðis avgjørt, at leikliga dystarúrslitið skal standa við.

**Kæruvegleiðing**

Sambært grein 10 í Aga- og etiskureglugerðini, kann úrskurðurin ikki kærast til Yvirkærunevndina.

**Staður, dagfesting og undirskrift:**

**Tórshavn 14. apríl 2025**

Eli Thorsteinsson
Formaður

Í Aga- og etiskunevndini eru:

- Eli Thorsteinsson, formaður og løgfrøðingur
- Ken Nónklett, varaformaður og løgfrøðingur
- Anni á Hædd, løgfrøðingur
- Jóhan T. Davidsen, løgfrøðingur
- Birita S. Samuelsen, løgfrøðingur

# AGA- & ETISKANEVNDIN

**KÆRA 3/2025**

| *FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: Kæra frá FSF um hending í dysti í Betri deildini hjá monnunum millum KÍ og EB/Streym leiktur 30. mars 2025** | |
| Deild: Betri deildin menn | Hvør hevur reist málið: Starvsnevndin |
| Kapping: Landskapping | Nevndin móttikið kæru: 4. apríl |
| Møguligt brot framt: 30. mars | Kærugjald goldið: Óviðkomandi |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: Óviðkomandi |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | Starvsnevndarummæli: Nei |

**Úrskurður**

Árni Frederiksberg fær 3 dystir leikbann fyri tilvitað at taka upp undir rørarnar hjá mótstøðuleikara, meðan bólturin ikki er í spæli.

**Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli**

EB/Streymur hevur í skrivi, dagfest 31. mars 2025, boða umsitingini hjá FSF frá einari hending, ið tekur seg upp í 93. minutti, har ein leikari hjá KÍ tekur upp undir rørarnar hjá einum leikara hjá EB/Streymi. Leikarin hjá EB/Streymi svarar spontant aftur við at sparka KÍ leikaran. EB/Streyma leikarin fær reytt kort, meðan KÍ leikarin ikki fær nakra revsing.

EB/Streymur metir hendingina vera bæði óetiska og skaðiliga fyri leikaramentannina og "fairness" í kappingini. EB/Streymur vísur á, at teirra leikari svaraði aftur í eini truplari støðu og varð ertaður á ein hátt, sum als ikki hoyrir heima í fótbólti. EB/Streymur metir tað ikki vera rímiligt, at bert teirra leikari verður revsaður, meðan tað onga avleiðing fær fyri mótstøðuleikaran.

EB/Streymur heitir á FSF um at eftirmeta støðuna og umhugsa eina linari revsing til teirra leikara. EB/Streymur vísur eisini á, at slíkir tilburðir skulu handfarast við einum rímiligum og rættvísum dómi, so at allir partar verða javnsettir í fótbólti.

Starvsnevndin hjá FSF hevur valt at taka málið um tilburðin millum Árna Frederiksberg og Meinhard Geyti upp sum kærumál. Umsitingin hjá FSF hevur biðið KÍ um viðmerkingar til málið.

KÍ hevur í skrivi frá 4. apríl svarað FSF-umsitingini aftur, at KÍ ikki hevur viðmerkingar til málið.

Starvsnevndin hevur 4. apríl biðið Aga- og etiskanevndina um at viðgerða málið sum kærumál.

**Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Vísandi til grein 2, 3 og 5 í aga- og etisku reglugerðini hjá FSF, hevur Aganevndin málsføri at viðgera hetta mál.

## AGA- & ETISKANEVNDIN

**Fakta í málinum**

Sambært dómarafrágreiðingini fær EB/Streyma-leikarin Meinhard Geyti reytt kort fyri at sparka Árna Frederiksberg. Dómarin staðfestir, at Árni møguliga hevur gjørt ella sagt okkurt við Meinhard fyri at erta hann, men dómarin sær ikki hetta.

Aga- og etiskanevndin hevur fingið útvegað og hugt eftir sjónvarpsupptøkum frá Televarpinum, ið vísa ítøkiligu hendingina.

Sjónvarpsupptøkurnar vísa greitt, at Árni, meðan bólturin ikki er í spæli, tilvitað tekur upp undir rørarnar hjá Meinhard Geyti beint aftaná, at dómarin hevur bríksláð fyri frísparki í sambandi við, at nakrir spælarar hjá KÍ og EB/Streymi hava stríðst um bóltin úti við eina hornaflaggið móti dystarenda.

Sjónvarpsupptøkurnar vísa eisini, at Meinhard Geyti sparkar Árna sum eina avleiðing av hesum.

**Lógarverkið**

Sambært § 6 í Aga- og etiskureglugerðini hevur Aga- og etiskanevndin heimild at geva leikbann til persónar, sum fremja brot á lógir og reglur hjá FSF, UEFA og FIFA.

Onnur viðkomandi lóggáva í hesum máli er Kappingarreglugerðin og vegleiðing um leikbann.

**Staðfestingar, metingar og niðurstøða**

Út frá upplýsingunum í málinum, herundir sjónvarpsupptøkunum frá Televarpinum, metir Aga- og etiskanevndin tað vera greitt, at Árni Frederiksberg tilvitað tekur upp undir rørarnar hjá Meinhard Geyti, meðan bólturin ikki er í spæli.

Í 2a (Fair Play) í kappingarreglunum stendur:

"Øll sum á ein ella annan hátt taka lut í føroyskum fótbólti og kappingum undir FSF skulu vísa virðing, integritet og góðan ítróttaranda í samsvari við meginreglurnar um fair play.

Gerðir, ið við vilja skaða integritetin í fótbóltsspælinum, eru bannaðar og kunnu hava við sær revsing."

Í § 37 í kappingarreglunum stendur:

"Heimilað verður Kappingarnevndini at áseta nærri reglur um leikbann av leikarum, venjarum og leiðarum, um útvísing ella burturvísing í kapping ella dysti í og uttan fyri Føroyar, um óhøviskan atburð ella málburð í samband við dyst, venjing ella venjingardyst."

Sambært vegleiðingini um leikbann, sum er samtykt av Kappingarnevndini 18. februar 2022, verður leikbann á 2 dystir givið fyri eitt sindur grovari brot, sum m.a.:

## AGA- & ETISKANEVNDIN

- “fyri roynd at sparka ella sláa um bólturin ikki er í spæli, ella um spælið fyrigongur aðrastaðni á vøllinum,
- fyri harðligan atburð mótvegis við- ella mótstøðuleikara.”

Leikbann á 3 dystir verður givið fyri grov brot sum m.a.:

- “at sparka ella sláa, um bólturin ikki er í spæli, ella um spælið fer fram aðrastaðni á vøllinum.”

Vegleiðingin um leikbann hevur ikki nakra áseting, ið fevnir ítøkiliga um tøku upp undir rørarnar hjá mótstøðuleikara. Aga- og etiskanevndin er tó av tí fatan, at tilburðurin mest hóskandi er at meta sum at sparka ella sláa, meðan bólturin ikki er í spæli.

Slíkur atburður kann harumframt ikki metast vera í samsvari § 2a í kappingarreglunum um at vísa virðing, integritet og góðan ítróttaranda.

Við heimild í § 6, nr. 3 (fyri persónar) í Aga- og etiskureglugerðini og vísandi til vegleiðingina um leikbann og til líknandi mál í øðrum londum, er Aga- og etiskanevndin eftir einari samlaðari meting komin til ta niðurstøðu, at Árni Frederiksberg skal hava 3 dystir leikbann fyri tilvitað at taka upp undir rørarnar hjá mótstøðuleikara, meðan bólturin ikki er í spæli.

**Kæruvegleiðing**

Sambært grein 10 í Aga- og etiskureglugerðini kann henda avgerð ikki kærast til Yvirkærunevndina.

**Staður, dagfesting og undirskrift:**

**Tórshavn 10. apríl 2025**

Ken Nónklett
varaformaður

Í Aga- og etiskunevndini eru: Eli Thorsteinsson, formaður og løgfrøðingur, Ken Nónklett, varaformaður og løgfrøðingur, Anni á Hædd, løgfrøðingur, Jóhan T. Davidsen, løgfrøðingur og Birita S. Samuelsen, løgfrøðingur.

Í hesum málið hava luttikið Ken Nónklett, sum virkandi formaður, Anni á Hædd og Jóhan Troest Davidsen.

Eli Thorsteinsson og Birita S. Samuelsen hava ikki tikið lut í viðgerðini vegna ógegni.

## AGA- & ETISKANEVNDIN

**KÆRA 4/2025**

| | |
|---|---|
| ***FSF-skrivstovan upplýsir Aga- og etiskunevndini:*** | |
| **Málsheitið: Kæra frá HB í sambandi við dyst í kappingini um Løgmanssteypið millum HB og KÍ tann 7. apríl 2025.** | |
| Deild: Steypakappingin – Betri deildin menn | Hvør hevur reist málið: HB |
| Kapping: Steypakappingin | Nevndin móttikið kæru: 11. apríl 2025 |
| Møguligt brot framt: 7. apríl 2025 | Kærugjald goldið: Ja |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: Ja |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | Starvsnevndarummæli: Nei |

**Úrskurður**

1. deildarliðið hjá KÍ monnum verður dømt at tapa dystin móti Víkingi, ið varð leiktur 5. apríl 2025, við málmuninum 0-3.

**Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli**

HB hevur í skrivi til FSF, dagf. 11. apríl 2025, kært KÍ fyri at nýta ólóligan leikara í steypadystinum millum HB og KÍ, ið varð leiktur í Gundadali 7. apríl 2025.

HB vísur á, at Ahmed Latif byrjaði inni fyri KÍ í 1. deildardysti, ið varð leiktur 5. apríl 2025, sum HB metir er sama leikumfar.

HB vísur eisini á, at leikarin ikki er fevndur av reglunum fyri leikarar undir 21 ár.

Sum eitt ískoyti til kæruna sendir HB avrit av avgerð 2/2022 hjá Aganevndini, sum varð kærd til Yvirkærunevndina. Yvirkærunevndin staðfesti avgerðina hjá Aganevndini.

KÍ er hoyrt í málinum og hevur latið sínar skrivligu viðmerkingar til FSF-umsitingina 14. apríl 2025.

KÍ viðmerkir, at Ahmed Latif spældi fyrstu 45. minuttirnar í 1. deild, tann 5. apríl, og aftur við besta liðnum hjá KÍ, tann 7. apríl. KÍ hevur tikið avgerðina í góðari trúgv við tað at talan er um tvær ymiskar kappingar – landskappingin og steypakappingin.

KÍ vísur á, at í fall KÍ hevur misskilt regluverkið, verður gingið út frá, at § 8, stk. 1 í kappingarreglugerðini er galdandi, sum ásetur, at: "Tá felag leikar í fleiri deildum, roknast hægsta deildin at hava leikt fyrst.". Eitt møguligt brot eigur tí at fáa avleiðing fyri 1. deild í landskappingini.

Seinni um dagin tann 14. april letur KÍ ískoytisviðmerkingar til FSF-umsitingina, har KÍ vísur til Aganevndarmál 2/2011.

Aga- og etiskanevndin hevur fingið málið til viðgerðar frá FSF-umstingini 14. apríl 2025.

**Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

# AGA- & ETISKANEVNDIN

Vísandi til grein 2, 3 og 5 í aga- og etisku reglugerðini hjá FSF, hevur Aganevndin málsføri at viðgera hetta mál.

**Fakta í málinum**

FSF-umsitingin hevur staðfest, at leikarin Ahmed Latif spældi við 1. deild monnum hjá KÍ tann 5. apríl 2025 og byrjaði inni á besta liðnum hjá KÍ 7. apríl 2025 í kappingini um Løgmanssteypið.

KÍ váttar tað sama í sínum skrivligu viðmerkingum.

**Lógarverkið**

§ 6, fyri løgfrøðiligar persónar, litra g) í Aga- og etiskureglugerðini heimilar Aga- og etiskunevndini at døma felag at tapa dyst.

Fordømi eru um, at felag, sum brúkar ólógligar leikarar, verður dømt at tapa dyst.

§ 8, stk. 1 í kappingarreglugerðini ásetur, at ein leikari, sum hevur luttikið í landskappingini í eini deild, ikki kann luttaka í landskappingardysti í eini lægri deild, uttan at sita yvir ein dyst í landskappingar ella steypakappingini, í hægru deildini. Í seinasta punktum er ásett, at “Tá felag leikar í fleiri deildum, roknast hægsta deildin at hava leikt fyrst.”

§ 8, stk. 2 ásetur, at tað bert er loyvt leikara at leika ein dyst hvønn leikdag. Tó er loyvt leikara í lægri vaksnamannadeild at verða eykaleikari í hægri vasknamannadeild sama leikdag.

§ 8, stk. 3 ásetur, at leikari sum ikki er fyltur 21 ár 1. januar í kappingarárinum, kann leika tveir dystir sama leikdag, tó er ikki loyvt leikara, sum byrjar inni í Meistaradeildini, at leika við U21 sama leikdag.

§ 8, stk. 4 ásetur, fríggjadagur, leygardagur, sunnudagur og mánadagur verða roknaðir sum ein leikdagur, eins og týsdagur, mikudagur og hósdagur verða roknaðir sum ein leikdagur.

§ 2 í kappingarreglunum fyri steypakappingar ásetur, at tey leikandi mugu lúka somu treytir, sum galdandi eru fyri luttøku í landskappingini.

§ 1, stk. 1, 2. punktum, í kappingarreglugerðini ásetur, at allir dystir í føroysku lands- og steypakappingini verða leiktir eftir teimum reglum, ið hesar kappingarreglur áseta.

**Staðfestingar, metingar og niðurstøða**

Vísandi til upplýsingarnar í málinum kann staðfestast, at Ahmed Latif hevur leikt fyrstu 45. minuttirnar í 1. deildardysti fyri KÍ tann 5. apríl 2025 og byrjaði inni á besta liðnum hjá KÍ tann 7. apríl 2025. Ahmed Latif er ikki yngri enn 21 ár.

HB vísir í síni kæru til mál 2/2022 hjá Aganevndini. Í hesum máli varð B36 dømt at tapa dyst móti B68 í bestu deildini fyri nýtslu av leikara yngri enn 21 ár, sum hevði spælt 3 dystir sama

## AGA- & ETISKANEVNDIN

leikdag. B36 førdi í málinum fram, at besta liðið hjá B36 eigur ikki at fáa ítróttarliga revsing vísandi til § 8, stk. 1 um, at hægsta deildin skal roknast at hava leikt fyrst.

Aganevndin kom í málinum til ta niðurstøðu, at talan var um ein leikara yngri enn 21 ár, og at málið tí skuldu viðgerast eftir § 8, stk. 3 og ikki § 8, stk. 1. Brotið var tí mett at vera framt í síðsta dystinum.

Yvirkærunevndin staðfesti niðurstøðuna hjá Aganevndini.

KÍ vísir í sínum viðmerkingum til mál hjá Aganevndini 2/2011, har NSÍ kærir Víking fyri at hava nýtt sama leikara í dysti í smádreingjadeildini tann 16. apríl 2011 og í dysti seinni sama dag í dreingjadeildini. Aganevndin kom til ta niðurstøðu, at Víkingur skuldi tapa dystin í smádreingjadeildini við 0-3.

Aga- og etiskanevndin metir, at § 8, stk. 1 og 2 í kappingarreglugerðini mugu lesast samanhangandi. Orðingin: "Tá felag leikar í fleiri deildum, roknast hægsta deildin at hava leikt fyrst." sum stendur í § 8, stk. 1, 2. punktum, má metast eisini vera galdandi í mun til § 8, stk. 2, tá ið talan er um leikarar, sum hava luttikið í lægri vaksnamannadeild, og sum kunnu verða eykaleikarar í hægri vaksnamannadeild sama leikdag.

Bæði § 8, stk. 1 og 2 áseta, at leikari bert hevur loyvi at leika ein dyst hvønn leikdag, umframt at ásetingarnar nágreina viðurskiftini í sambandi við luttøku millum hægri og lægri deildir.

§ 8, stk. 3 ásetur, at leikarar yngri enn 21 ár kunnu leika tveir dystir sama leikdag, men hevur ikki ásetingar um flytan millum deildir. Ikki annað enn, at leikari, sum byrjar inni í Meistaradeildini, ikki er loyvt at leika við U21 sama leikdag.

Aga- og etiskanevndin metir, at § 8, stk. 1 og 2 hanga soleiðis saman, at hægra deildin altíð skal metast at hava leikt fyrst, um dystirnir verða leiktir sama leikdag sambært § 8, stk. 4 í kappingarreglugerðini.

Aga- og etiskanevndin metir tískil, at sjálvt um 1. deild í veruleikanum spældi fyrst, so skal besta liðið roknast at hava hava spælt fyrst. Ahmed Latif byrjaði inni fyri besta liðið, og hann kundi tí ikki lógliga leika fyri 1. deild sama leikdag.

Eftir eini samlaðari meting er Aga- og etiskanevndin komin til ta niðurstøðu, at KÍ hevur framt brot á § 8, stk. 1 í kappingarreglugerðini við at lata Ahmed Latif spæla 1. deildardystin móti Víkingi 5. apríl 2025.

Fordømi eru um, at felag, sum brúkar ólógligar leikarar, verður dømt at tapa dyst.

Vísandi til ásetingina í § 8, stk. 1, 2. punktum um, at hægsta deildin má roknast at hava leikt fyrst, og við heimild í Aga- og etiskureglugerðini § 6, fyri løgfrøðiligar persónar, litra g)
verður 1. deildarliðið hjá KÍ monnum dømt at tapa dystin móti Víkingi, ið varð leiktur 5. apríl 2025, við málmuninum 0-3.

## AGA- & ETISKANEVNDIN

| |
|---|
| Vísandi til § 1, stk. 1, 2. punktum í kappingarreglugerðini og § 2 í kappingarreglugerðini fyri steypakappingar, metir Aga- og etiskanevndin ikki tað hevur týdning fyri málið annars, at talan er um dystir í landskappingini og steypakappingini. |
| **Kæruvegleiðing** |
| Sambært § 10, fyri feløg, litra f, í Aga- og etiskureglugerðini kann avgerð um, at felag verður dømt at tapa dyst, kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar eftir móttøku av úrskurðinum. |
| **Staður, dagfesting og undirskrift:**<br>**Tórshavn 16. apríl 2025**<br>Ken Nónklett<br>varaformaður |
| Í Aga- og etiskunevndini eru: Eli Thorsteinsson, formaður og løgfrøðingur, Ken Nónklett, varaformaður og løgfrøðingur, Anni á Hædd, løgfrøðingur, Jóhan T. Davidsen, løgfrøðingur og Birita S. Samuelsen, løgfrøðingur.<br><br>Í hesum málið hava luttikið Ken Nónklett, sum virkandi formaður, Anni á Hædd, Jóhan Troest Davidsen og Birita S. Samuelsen.<br><br>Eli Thorsteinsson hevur ikki tikið lut í viðgerðini vegna ógegni. |

## AGA- & ETISKANEVNDIN

**KÆRA 5/2025**

| | |
|---|---|
| ***FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:*** | |
| **Málsheitið: AB kærir NSÍ fyri brúk av ólógligum leikara, U21 dreingir** | |
| Deild: U21 Dreingir, Bólkur A | Hvør hevur reist málið: AB |
| Kapping: Landskapping | Nevndin móttikið kæru: 24.09.2025 |
| Møguligt brot framt: 17.09.2025 | Kærugjald goldið: Ja |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: Ja |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | FSF-ummæli: Ja |

| **Úrskurður** |
|---|
| Staðfest er, at NSÍ U21 dreingir høvdu ein leikara á sínum liði í dysti móti AB leiktur 17. september 2025, sum ikki er skrásettur sum leikari hjá NSÍ. Talan er um leikaran Viktor Jæger Pedersen. Leikarin leikti undir navninum á øðrum leikara hjá NSÍ.<br><br>Mong fordømi eru um, at felag verður dømt at tapa dyst fyri brúk av ólógligum leikara. Mong fordømi eru eisini um, at felag fær bót fyri at svika við nøvnum á dómaraseðilinum.<br><br>NSÍ verður dømt at tapa dystin móti AB leiktur 17. september 2025 við málmuninum 0-3 fyri brúk av einum ólógligum leikara, við tað at hesin ikki hevur skrásett leikaraloyvi í felagnum. Fyri svik við einum navni á dómaraseðilinum fær NSÍ eisini 2.000,- kr. í bót.<br><br>Tapið við málmuninum 0-3 er ásett við heimild í § 6, bókstav g í 3. reglubroti í Aga- og etiskureglugerðini og samsvarandi grein 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt. Bótin til NSÍ er ásett við heimild í grein 6, bókstav c í 1. reglubroti í Aga- og etiskureglugerðini.<br><br>Einans úrskurðurin um, at NSÍ er dømt at tapa dystin, kann kærast til Yvirkærunevndina. Freistin at kæra er 5 dagar. |
| **Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli** |
| AB kærir NSÍ fyri brúk av ólógligum leikara við tað at ein navnnevndur leikari, sum ikki hevur leikaraloyvi hjá NSÍ, leikti við NSÍ undir navninum á einum øðrum NSÍ-leikara.<br><br>NSÍ hevur í partshoyringini viðgingi lógarbrotið. |
| **Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið** |
| Vísandi til grein 2, 3 og 5 í Aga- og etiskureglugerðini hjá FSF, hevur Aganevndin málsføri at viðgera hetta mál. |
| **Fakta í málinum** |
| Skrivstovan hjá FSF hevur upplýst málið og eftirkannað skrásetingarnar um nevnda leikara. Staðfest er, at kæran snýr seg um brúk av leikara, sum ikki hevur leikaraloyvi í NSÍ. |
| **Lógarverkið** |
| Sambært grein 15 í Kappingarreglunum, skal leikari tilmeldast leikaraskráseting FSF's og er leikarin at meta sum lógligur leikari fyri tað felagið, leikarin er skrásettur hjá. |

## AGA- & ETISKANEVNDIN

Sambært grein 6 í Kappingarreglunum fyri yngri deildir, skal COMET skipanin brúkast í staðin fyri dómarakort og leikaraváttan og leikaralistin skal verða gjørdur í COMET skipanini, áðrenn dystur verður leiktur.

Sambært grein 28 í Kappingarreglunum, skulu allir leikarar skrásetast á dómaraseðilin.

**Staðfestingar, metingar og niðurstøða**

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at NSÍ brúkti ein leikara, sum ikki hevði leikaraloyvi í felagnum og sum leikti undir følskum navni á dómaraseðilinum í dystinum móti AB.

Aga- og etiskanevndin metir, at tað hevur týdning, at feløgini virða dómaraseðilin og tann týdning, hann hevur sum amboð fyri gjøgnumskygni og eftirlit.

Svik við nøvnum á dómaraseðilinum er brot á regluverk FSF´s, sum hóttir ítróttarliga integritetin í kappingum fyriskipaðar av FSF. Fleiri fordømi eru um, at feløg eru dømd at tapa dyst við málmuninum 0-3 fyri brúk av ólógligum leikarum, umframt at fordømi eisini eru um at feløg eru áløgd bót fyri svik og fusk við nøvnum á dómaraseðilinum.

Aga- og etiskanevndin hevur áður revsa leikarar persónliga fyri at hava leikt dyst undir følskum navni, sí t.d. kæru 1/2024 og 3/2024. Í hesum ítøkiliga føri hevur nevndin tikið avgerð um ikki at revsa persónliga, av tí at umrøddi leikarin ikki hevur leikaraloyvið í NSÍ ella øðrum føroyskum felagi.

**Kæruvegleiðing**

Sambært grein 10, litra f í Aga- og etiskureglugerðini, kann úrskurðurin um at NSÍ tapir dystin, kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar eftir, at úrskurðurin er móttikin.

**Staður, dagfesting og undirskrift:**

**Tórshavn 1. oktober 2025**

Eli Thorsteinsson

Eli Thorsteinsson
formaður

Í Aga- og etiskunevndini eru:
- Eli Thorsteinsson, formaður
- Ken Nónklett, næstformaður
- Anni á Hædd, løgfrøðingur
- Jóhan Troest Davidsen, løgfrøðingur
- Birita Sandberg Samuelsen, løgfrøðingur

## AGA- & ETISKANEVNDIN

**KÆRA 6/2025**

| *FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: B68 kærir ÍF fyri brúk av ólógligum leikara, 2. deild menn** | |
| Deild: 2. deild menn | Hvør hevur reist málið: B68 |
| Kapping: Landskapping | Nevndin móttikið kæru: 24.09.2025 |
| Møguligt brot framt: 20. september 2025 | Kærugjald goldið: Ja |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: Ja |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | Starvsnevndarummæli: Ongar viðmerkingar |

**Úrskurður**

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at Jóan Petur Samson Jónsson var at rokna sum ólógligur leikari fyri ÍF til dystin móti B68 tann 20. september 2025, við tað at tað ikki var loyvt leikaranum at flyta úr 1. deild til 2. deild at leika dyst móti B68 tann 20. september 2025, tí hetta hendi eftir at fjórðseinasti dystur var leiktur í lægri deildini.

At gera brúk av ólógligum leikara er brot á regluverk FSF's. Fordømi eru um, at slík brot verða revsaði við, at felagið verður dømt at tapa dystin í teirri deild, sum leikarin leikti ólógliga.

ÍF verður tí dømt at tapa dystin móti B68, sum varð leiktur 20. september 2025 við málmuninum 0-3 sambært grein 6, bókstav g í 3. reglubroti í Aga- og etiskureglugerðini og samsvarandi grein 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

**Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli**

ÍF hevur í partshoyringini viðurkent brot á grein 9 í Kappingarreglunum fyri fótbólt og harmast mistakið.

**Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Vísandi til grein 2, 3 og 5 í Aga- og etiskureglugerðini hjá FSF, hevur Aga- og etiskanevndin málsføri at viðgera hetta mál.

**Fakta í málinum**

Skrivstovan hjá FSF hevur upplýst málið og eftirkannað skrásetingarnar á dómaraseðlunum. Staðfestast kann, at Jóan Petur Samson Jónsson ikki var á dómarseðlinum hjá 2. deildarliðnum hjá ÍF tann 13. september 2025, sum er fjórðseinasti dystur hjá 2. deild monnum. Leikarin er á leikaralistanum hjá ÍF í 1. deild monnum tann 13. september 2025, har hann hevur leikt dyst. Somuleiðis er upplýst, at leikarin leikti við ÍF í 2. deild monnum tann 20. september 2025 móti B68.

**Lógarverkið**

Kappingarreglurnar áseta í grein 9, at leikari kann ikki flyta frá hægri til lægri deild eftir at fjórðseinasti dystur er leiktur í lægri deildini í kappingarárinum. Hetta umfatar ikki leikarar, sum koma undir grein 8, stk. 3. Tó er loyvt leikara, sum í kappingarárinum hevur leikt í mesta lagi 3 dystir í hægri deildini, at flyta niður í lægri deildina í hesum dystum samsvarandi ásetingunum í grein 8.

Sambært grein 6 í Aga- og etiskureglugerðini, kunnu persónar og feløg verða dømd agarevsing fyri brot á fótbóltsregluverkið.

# AGA- & ETISKANEVNDIN

**Staðfestingar, metingar og niðurstøða**

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at Jóan Petur Samson Jónsson var at rokna sum ólógligur leikari fyri ÍF til dystin móti B68 tann 20. september 2025, við tað at tað ikki var loyvt leikaranum at flyta úr 1. deild til 2. deild at leika dyst móti B68 tann 20. september 2025, tí hetta hendi eftir at fjórðseinasti dystur var leiktur í lægri deildini. Leikarin kemur ikki undir nakað av undantøkunum ásett í grein 9 í Kappingarreglunum fyri fótbólt. Talan er tí um brot á grein 9 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

Fleiri fordømi eru um, at feløg eru dømd at tapa dyst við málmuninum 0-3 fyri brúk av ólógligum leikarum. Aga- og etiskanevndin avgerð tí, at ÍF verður dømt at tapa dystin við málmuninum 0-3 fyri brúk av ólógligum leikara. Tapið við málmuninum 0-3 er ásett við heimild í grein 6, bókstav g í 3. reglubroti í Aga- og etiskureglugerðini og samsvarandi grein 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

**Kæruvegleiðing**

Sambært grein 10, litra f í Aga- og etiskureglugerðini, kann úrskurðurin um at ÍF tapir dystin, kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar eftir, at úrskurðurin er móttikin.

**Staður, dagfesting og undirskrift:**

**Tórshavn 1. oktober 2025**

Eli Thorsteinsson
formaður

Í Aga- og etiskunevndini eru:

- Eli Thorsteinsson, formaður
- Ken Nónklett, næstformaður
- Anni á Hædd, løgfrøðingur
- Jóhan Troest Davidsen, løgfrøðingur
- Birita Sandberg Samuelsen, løgfrøðingur

## AGA- & ETISKANEVNDIN

**KÆRA 7/2025**

| *FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: TB kærir Skála ÍF fyri brúk av ólógligum leikara, 2. deild menn** | |
| Deild: 2. deild menn | Hvør hevur reist málið: TB |
| Kapping: Landskapping | Nevndin móttikið kæru: 28.09.2025 |
| Møguligt brot framt: 20. september 2025 | Kærugjald goldið: Ja |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: Ja |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | Starvsnevndarummæli: Ongar viðmerkingar |

**Úrskurður**

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at Rói Dahl Olsen var at rokna sum ólógligur leikari fyri Skála ÍF til dystin móti TB tann 20. september 2025, við tað at tað ikki var loyvt leikaranum at flyta úr 1. deild til 2. deild at leika dyst móti TB tann 20. september 2025, tí hetta hendi eftir at fjórðseinasti dystur var leiktur í lægri deildini.

At gera brúk av ólógligum leikara er brot á regluverk FSF's. Fordømi eru um, at slík brot verða revsaði við, at felagið verður dømt at tapa dystin í teirri deild, sum leikarin leikti ólógliga.

Skála ÍF verður tí dømt at tapa dystin móti TB, sum varð leiktur 20. september 2025 við málmuninum 0-3 sambært grein 6, bókstav g í 3. reglubroti í Aga- og etiskureglugerðini og samsvarandi grein 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

**Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli**

Skála ÍF hevur í partshoyringini viðmerkt, at felagið metir ikki at leikarin var ólógligur leikari til dystin móti TB tann 20. september 2025 í 2. deild hjá monnum. Skála ÍF vísir á, at leikarin ikki byrjaði inni í hægri deild og sambært felagnum hevur leikarin ikki skift støðu sum leikari, ið flytur frá hægri til lægri deild.

**Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Vísandi til grein 2, 3 og 5 í Aga- og etiskureglugerðini hjá FSF, hevur Aga- og etiskanevndin málsføri at viðgera hetta mál.

**Fakta í málinum**

Skrivstovan hjá FSF hevur upplýst málið og eftirkannað skrásetingarnar á dómaraseðlunum. Staðfestast kann, at Rói Dahl Olsen leikti við 2. deildarliðnum hjá Skála ÍF tann 13. september 2025, sum er fjórðseinast dystur hjá 2. deild monnum, og við 1. deildarliðnum hjá Skála ÍF tann 14. september 2025. Somuleiðis er upplýst, at leikarin leikti við 2. deildarliðnum hjá Skála ÍF tann 20. september 2025 og leikti við 1. deildarliðnum hjá Skála ÍF sum eykaleikari sama dag.

**Lógarverkið**

Kappingarreglurnar áseta í grein 9, at leikari kann ikki flyta frá hægri til lægri deild eftir at fjórðseinasti dystur er leiktur í lægri deildini í kappingarárinum. Hetta umfatar ikki leikarar, sum koma undir grein 8, stk. 3. Tó er loyvt leikara, sum í kappingarárinum hevur leikt í mesta lagi 3 dystir í hægri deildini, at flyta niður í lægri deildina í hesum dystum samsvarandi ásetingunum í grein 8.

## AGA- & ETISKANEVNDIN

Sambært grein 6 í Aga- og etiskureglugerðini, kunnu persónar og feløg verða dømd agarevsing fyri brot á fótbóltsregluverkið.

**Staðfestingar, metingar og niðurstøða**

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at Rói Dahl Olsen var at rokna sum ólógligur leikari fyri Skála ÍF til dystin móti TB tann 20. september 2025, við tað at tað ikki var loyvt leikaranum at flyta úr 1. deild til 2. deild at leika dyst móti TB tann 20. september 2025, tí hetta hendi eftir at fjórðseinasti dystur var leiktur í lægri deildini. Frágreiðingin hjá Skála ÍF, m.a. vísandi til grein 8, stk. 2 í Kappingarreglunum fyri fótbólt, kann ikki viðføra eina broyting hesum viðvíkjandi. Leikarin kemur ikki undir nakað av undantøkunum ásett í grein 9 í Kappingarreglunum fyri fótbólt. Talan er tí um brot á grein 9 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

Fleiri fordømi eru um, at feløg eru dømd at tapa dyst við málmuninum 0-3 fyri brúk av ólógligum leikarum. Aga- og etiskanevndin avgerð tí, at Skála ÍF verður dømt at tapa dystin við málmuninum 0-3 fyri brúk av ólógligum leikara. Tapið við málmuninum 0-3 er ásett við heimild í grein 6, bókstav g í 3. reglubroti í Aga- og etiskureglugerðini og samsvarandi grein 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

**Kæruvegleiðing**

Sambært grein 10, litra f í Aga- og etiskureglugerðini, kann úrskurðurin um at Skála ÍF tapir dystin, kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar eftir, at úrskurðurin er móttikin.

**Staður, dagfesting og undirskrift:**

**Tórshavn 1. oktober 2025**

Eli Thorsteinsson
formaður

Í Aga- og etiskunevndini eru:

- Eli Thorsteinsson, formaður
- Ken Nónklett, næstformaður
- Anni á Hædd, løgfrøðingur
- Jóhan Troest Davidsen, løgfrøðingur
- Birita Sandberg Samuelsen, løgfrøðingur

## AGA- & ETISKANEVNDIN

**KÆRA 8/2025**

| *FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: ÍF kærir EB/Streym fyri brúk av ólógligum leikara, 2. deild menn** | |
| Deild: 2. deild menn | Hvør hevur reist málið: ÍF |
| Kapping: Landskapping | Nevndin móttikið kæru: 17.10.2025 |
| Møguligt brot framt: 4. oktober 2025 | Kærugjald goldið: Nei |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: Ja |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | Starvsnevndarummæli: Ongar viðmerkingar |

| **Úrskurður** |
|---|
| Aga- og etiskanevndin staðfestir, at kærugjaldið á kr. 1.000 sambært grein 8 í Aga- og etiskureglugerðin ikki er móttikið. Av hesari orsøk verður kæran avvíst og ikki viðgjørd. |
| **Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli** |
| EB/Streymur hevur ikki sent frágreiðing inn til FSF í samband við kæruna frá ÍF. |
| **Heimildir hjá Aga- og etiskunevndini at viðgera málið** |
| Vísandi til grein 2, 3 og 5 í Aga- og etiskureglugerðini hjá FSF, hevur Aga- og etiskanevndin málsføri at viðgera hetta mál. |
| **Fakta í málinum** |
| Skrivstovan hjá FSF hevur upplýst málið og staðfest at kærugjaldið ikki er móttikið. Skrivstovan hevur upplýst kæraranum um manglandi kærugjaldið tann 7. oktober 2025 umframt eisini at hava vegleitt kæraranum um hvar kærugjaldið skal flytast. Hóast hetta er onki kærugjald móttikið. |
| **Lógarverkið** |
| Ásett er í grein 8 í Aga- og etiskureglugerðin, at við kæruni til Aga- og etiskunevndina skulu fylgja kr. 1.000, sum verða afturgoldnar, um kæran vinnur sømdir. |
| **Staðfestingar, metingar og niðurstøða** |
| Aga- og etiskanevndin staðfestir, at kærugjaldið á kr. 1.000 ikki er móttikið. Av hesari orsøk verður kæran avvíst og ikki viðgjørd. |
| **Kæruvegleiðing** |
| Úrskurðurin kann ikki kærast til Yvirkærunevndina. |
| **Staður, dagfesting og undirskrift:**<br><br>**Tórshavn 18. oktober 2025**<br>Eli Thorsteinsson<br>Eli Thorsteinsson<br>formaður |
| Í Aga- og etiskunevndini eru: Eli Thorsteinsson, formaður, Ken Nónklett, næstformaður, Anni á Hædd, løgfrøðingur, Jóhan Troest Davidsen, løgfrøðingur, Birita Sandberg Samuelsen, løgfrøðingur |

fsf.fo